| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>25. mai 2022 | Blað nr.: 465 |
| | | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 25. mai 2022 **Kl**. 16:00
**Stað:** Býráðssalurin
**Málsnr:** 106/22-132/22

**FUNDARLEIÐARI:**
Heðin Mortensen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Annfinn Brekkstein
Tróndur Sigurðsson
Kári Johansen
Kristianna Winther Poulsen
Bjørg Dam
Elsa Berg
Jákup Dam
Annika Olsen
Birgir Nielsen
Ruth Vang
Jón Kragesteen
Birita Baldvinsdóttir Iversen

**LUTTÓKU EISINI:**
Eyðna Justinussen
Jóan Petur Hentze
Eyðfríð Jacobsen
Barbara Vang

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 106/22 | 22/02082-1 | Súna Mørk berst frá at møta á býráðsfundi 25. mai 2022 | 468 |
| 107/22 | 22/02523-1 | Gunvør Balle berst frá at møta á býráðsfundi 25. mai 2022 | 469 |
| 108/22 | 22/00011-1 | Mál beind í nevndir 2022 | 470 |
| 109/22 | 22/01848-2 | Loyvi til víðarisølu av matr. nr. 22aa Kaldbak | 472 |
| 110/22 | 19/00065-9 | Matr.nr. 255dc, Kirkjubbøur,Argir. Eigari vil selja kommununi grundstykkið. | 474 |
| 111/22 | 22/01431-1 | Bygginevnd fyri innkomuvegin | 476 |
| 112/22 | 20/04153-1 | Val av hegn- og vatnsýnisnevnd fyri 4 ár | 477 |
| 113/22 | 22/02081-1 | Nevndarlimur til Visit Tórshavn 2022 | 478 |
| 114/22 | 20/00089-1 | Ferðavinnupolitikkur 2021-2025 | 480 |
| 115/22 | 22/02292-1 | Eykajáttan til konto 5370 stuðul til íløgur | 487 |
| 116/22 | 22/01951-1 | Skúlin á Fløtum - undirvísingarhøli | 489 |
| 117/22 | 18/04396-3 | Eftirmeting av sernámsfrøðiliga økinum í fólkaskúlunum | 491 |
| 118/22 | 21/04845-2 | Umsókn um fígging til forskúlalíknandi tilboð í Kaldbaks skúla skúlaárið 2022-23 | 506 |
| 119/22 | 22/01146-3 | Marknaumskipan á Bakkahellu 2, Tórshavn | 510 |
| 120/22 | 22/01384-1 | Keyp av mannskapskúrum til bygningsrakstur | 512 |
| 121/22 | 22/01410-1 | Bráðfeingis ábøtur á vegakervið 2022 | 514 |
| 122/22 | 14/00949-2 | Vetrarfriðing í Tórshavnar kommunu | 516 |
| 123/22 | 20/04029-1 | Ferðslutrygd við Eysturskúlan | 523 |
| 124/22 | 19/00853-1 | Dagføring av Jøkulstræti | 526 |
| 125/22 | 21/01366-1 | Kirkjugarðsleiðin í Hoyvík | 529 |
| 126/22 | 21/04189-1 | Broyting av almennu byggisamtyktini fyri matr. nr. 4a til A3 øki, í smb. við útstykking oman fyri Argjahamar | 533 |
| 127/22 | 22/00644-2 | Nýggj serstøk byggisamtykt við Miðhorn | 536 |
| 128/22 | 18/03714-1 | Serstøk byggisamtykt fyri íbúðarbygging við Hvannasundsgøtu, matr. nr. 999a og 999ai, Tórshavn | 539 |
| 129/22 | 22/01978-1 | Ársroknskapur fyri Tórshavnar kommunu 2021 | 542 |
| 130/22 | 22/01979-1 | Framflytingar fyri roknskaparárið 2021 | 544 |

| | | | |
| --- | --- | --- | --- |
| 131/22 | 22/00009-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2022 | 546 |
| 132/22 | 22/01143-6 | Søla matr.nr. 135pu, Hoyvík. ( Oman GII 7 ) | 548 |

**Til viðgerðar**

## 106/22 Súna Mørk berst frá at møta á býráðsfundi 25. mai 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 25.05.2022 | 106/22 | 22/02082-1 |

Málslýsing
Súna Mørk hevur boðað frá, at henni berst frá at møta til býráðsfundin.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunustýrislógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Birita Baldvinsdóttir Iversen, eru loknar.

**Býráðsfundur 25. mai 2022:** Birita B. Iversen tók sæti fyri Súnu Mørk.

# 107/22 Gunvør Balle berst frá at møta á býráðsfundi 25. mai 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 25.05.2022 | 107/22 | 22/02523-1 |

**Málslýsing**
Gunvør Balle hevur boðað frá, at henni berst frá at møta til býráðsfundin.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunustýrislógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Jón Kragesteen, eru loknar.

**Býráðsfundur 25. mai 2022:** Jón Kragesteen tók sæti fyri Gunvør Balle.

# 108/22 Mál beind í nevndir 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 27.01.2022 | 3/22 | 22/00011-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 25/22 | 22/00011-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.03.2022 | 55/22 | 22/00011-1 |
| 4 Býráðsfundur | 28.04.2022 | 82/22 | 22/00011-1 |
| 5 Býráðsfundur | 25.05.2022 | 108/22 | 22/00011-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 27. januar 2022:** Tikið til eftirtektar**.**

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 24. mars 2022:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 28. apríl 2022:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 25. mai 2022:** Tikið til eftirtektar.

# 109/22 Loyvi til víðarisølu av matr. nr. 22aa Kaldbak

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.05.2022 | 134/22 | 22/01848-2 |
| 2 Býráðsfundur | 25.05.2022 | 109/22 | 22/01848-2 |

**Upprunin til málið**

Eigari hevur heitt á ognarmeklara um at seta grundstykkið á sølulista, og søkir ognarmeklarin vegna eigaran, kommununa um loyvi til víðarisølu. Grundstykkið verður ikki sett á sølulistan hjá meklara, fyrr enn loyvið fyriliggur.

**Lýsing av málinum**

Matr.nr. 22aa, Kaldbak. Adressa. Við Krossá 6.
Talan er um grundstykki omanfyri vegin. Vídd 520m2.
Grundstykkið er óútgrivið, og er stórur hæddarmunur í lendinum.

Talan er um eina eldri útstykking, har fyrstu skeytini eru tinglýst í 2009. Tað hevur gingið sera seint við sølu og bygging í útstykkingini.
Talan er um 10 stykkir, og liggja 4 teirra framvegis óbygd.

Býráðið samtykti í 2017, at lýsa óseldu grundstykkini alment til sølu hjá Ognarmeklara.

Talan var tá um 6. grundstykkir.

Ognarmeklarin metti søluvirðið á stykkjunum til 411,5 kr.m2, svarandi til tkr. 214 fyri matr.nr. 22aa.

Nevnda stykkið var tá selt í fríðari sølu fyri tkr. 200.

Í 2019, søktu táverandi eigarar kommununa, um at keypa stykkið aftur, ella í øðrum lagi at fáa loyvi til at selja stykkið.

Býráðið samtykti tá at fylgja tilmælinum frá umsitingini, um ikki at keypa stykkið aftur, men í staðin at loyva víðarisølu av grundstykkinum vísandi til at stykkið var selt í fríðari sølu. Núverandi eigari keypti í februar 2020 óbygda stykkið fyri tkr. 275.

Viðmerkjast kann, at kommunan frammanundan hevur samtykt ikki at keypa trý av grundstykkjunum í útstykkingini innaftur,men í staðin at loyva víðarsølu, vísandi til at stykkini eru seld í fríðari sølu.

**Lógir, ásetingar o.a.** Kommunustýrislógin. Kunngerð nr. 122 frá 22. desembmer 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn. Tinglýstir servituttir.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

| | Býráðsfundur<br>25. mai 2022 | Blað nr.: 473 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

**Skjøl.** Umsókn frá Meklara. Kortskjal.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina, ikki at keypa grundstykkið aftur, men í staðin at loyva víðarisølu av grundstykkinum, vísandi til at stykkið er selt í fríðari sølu.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. mai 2022:** Einmælt samtykt.

| | Býráðsfundur<br>25. mai 2022 | Blað nr.: 474<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

## 110/22 Matr.nr. 255dc, Kirkjubbøur,Argir. Eigari vil selja kommununi grundstykkið.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.05.2022 | 133/22 | 19/00065-9 |
| 2 Býráðsfundur | 25.05.2022 | 110/22 | 19/00065-9 |

**Upprunin til málið.** Eigari hevur í teldubrævi boðað frá, at hon ynskir at lata grundstykkið innaftur til kommununa.

**Lýsing av málinum.**
Matr.nr. 255dc, í útstykkingini Við Klingurstjørn 2.
Grundstykkið er grovplanerað. Vídd 402m2.
Søluprísur eftir regulering kr. 624.708,-
Skeytið er tinglýst 25.06.2020.

Sambært áseting í skeytinum, falla allar útreiðslur í samband við møguliga afturskeyting til keypara. Tórshavnar kommuna verður hildin skaðaleys fyri eini hvørji útreiðslu í hesum sambandi.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/léttar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla Býráðnum til umvegis fíggjarnevndina, at keypa stykkið aftur fyri upprunaligan søluprís kr. 624.708,- og at luta stykkið útaftur sambært reglugerð.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. mai 2022:** Einmælt samtykt.

## 111/22 Bygginevnd fyri innkomuvegin

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 25.05.2022 | 111/22 | 22/01431-1 |

**Málslýsing:**
Val av 2 býráðslimum í bygginevndina í sambandi við innkomuvegin.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja 2 limir í bygginevndina sambært lutfalsvalháttinum.

**Býráðsfundur 25. mai 2022:** Tikið av skrá.

| | Býráðsfundur<br>25. mai 2022 | Blað nr.: 477<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

# 112/22 Val av hegn- og vatnsýnisnevnd fyri 4 ár

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 14.01.2021 | 11/21 | 20/04153-1 |
| 2 Býráðsfundur | 25.05.2022 | 112/22 | 20/04153-1 |

**Málslýsing:**
Sbrt. § 44 í lóg nr. 171 "Om hegn og markfred" frá 18. mai 1937 og § 15 í lóg nr. 169 "Om benyttelse af indsøer og vandløb" frá 18. mai 1937 velur býráðið 3 hegn- og vatnsýnismenn.

Samstundis verða valdir 3 tiltakslimir.

Í nevndini sita: Vivi Kirke Davidsen, Kári Mortensen, Edith Vang, Torvald Lützen, Heri Ó. Dam. Varalimir: Fróði Olsen, Leivur Hansen, Jóannes Guttesen, Anna Rubeksen, Karlon Winther.

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja nevndarlimir í nevndina, umframt tiltakslimir.

**Býráðsfundur 14. januar 2021: Vald vórðu:**

| Fastir limir | Varalimir |
|---|---|
| Thorvald Lútzen | Anna Rubeksen |
| Bergur Dam Jensen | Heri Dam |
| Bjartur Brekkstein | Niels á Reynatúgvú |
| Karlot Hergeirsson | Rúni S. Patursson |
| Dánjal Hansen | Fróði Olsen |

**Ískoyti:**
Á býráðsfundi 14. januar 2021 varð Thorvald Lützen valdur í hegn- og vatnsýnisnevndina, og varð Anna Rubeksen vald sum varalimur í nevndina. Bæði tvey hava nú tikið seg úr nevndini, og tí skal nýggjur limur og varalimur veljast í nevndina.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja ein nevndarlim og ein varalim í nevndina

**Býráðsfundur 25. mai 2022:** Valdur varð Sigurd Hansen, sum fastur limur og Tóni Dam, sum varalimur.

# 113/22 Nevndarlimur til Visit Tórshavn 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 25.05.2022 | 113/22 | 22/02081-1 |

## Upprunin til málið

Býráðið skal velja ein nevndarlim og ein tiltakslim í 2022 í nevndina fyri Visit Tórshavn.

Felagið Tórshavn (Visit Tórshavn) hevur havt aðalfund tann 18. mai 2022.

Nevndarlimur Sóleyð H. Hammer + tiltakslimur Eirik Suni Danielsen, sum eru vald av Tórshavnar kommunu, standa fyri vali í nevndina fyri Visit Tórshavn.

## Lýsing av málinum

Nevndin fyri Visit Tórshavn telur 5 limir, sum sita 2 ár í senn.

Annaðhvørt ár standa 2 nevndarlimir fyri vali, og annaðhvørt ár standa 3 limir fyri vali.

2 nevndarlimir verða valdir beinleiðis av Tórshavnar kommunu og 3 verða valdir av Felagnum Tórshavn á aðalfundi.

Teir 2 nevndarlimirnir, ið Tórshavnar kommuna velur, og 2 av nevndarlimunum, ið Felagið Tórshavn velur, skulu vera persónar, sum eru leiðarar ella stjórar innan ferðavinnu, handilsvinnu, matstovuvinnu og møguliga aðra vinnu, sum hevur ein viðkomandi leiklut í ferðavinnu høpi.

3. nevndarlimurin, sum Felagið Tórshavn velur, umboðar Felagið Tórshavn, og kann verða valdur millum limir felagsins ella umboðandi almennan ella privatan stovn, savn, mentanarlív ella líknandi.

Nevndarlimir kunnu ikki vera býráðslimir. Nevndarlimir kunnu verða valdir aftur.

Limirnir, sum standa fyri valið, blivu valdir av samgonguni í 2019, og andstøðan valdi lim og varalim í 2020. Samgongan valdi í 2021 nevndarlim og tiltakslim 2021. Í 2022 er tað andstøðan, sum skal velja lim og varalim.

Nevndin skipar seg sjálva við formanni og næstformanni. Nevndin er viðtøkufør, tá í minsta lagi 3 limir eru á fundi, harav ein skal vera formaðurin harav annar skal verða valdur av Tórshavnar kommunu, og 3 nevndar limir verða valdir fyri 2 ár ".

Hesir persónar sita í nevndini í dag:

Herleif Hammer, Tjóðsavnið
John Mikkelsen, Gist&Vist
Theresa Turiðardóttir Kreutzmann, Commit
Sóley Heradóttir Hammer, Hugskotið
Henny á Líknargøtu, Smyril-Line
Junie Hansen/vegna ferðavinnuna, Smyril-Line

Eirik Suni Danielsen, (arbeiddi á Gjáargarði)
Rúna Erlandsdóttir, AtlanticAirways
Helgi Michelsen,Tjóðsavnið
Eyðna av Fløtum, Gist&Vist

Sóleyð H. Hammer er leiðari í Hugskotinum og Eirik Suni Danielsen er leiðari í Tilhaldinum. Bæði ynskja at taka við afturvali.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli:** Deildarleiðarin á Stjórnarskrivstovuni og kommunustjórin mæla til, at Býráðið velir lim og varalim í nevndina fyri Visit Tórshavn.

**Býráðsfundur 25. mai 2022:** Vald varð Sóleyð Hammer, sum fastur limur og Eirik Suni Danielsen, sum varalimur.

## 114/22 Ferðavinnupolitikkur 2021-2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 10.02.2020 | 10/20 | 20/00089-1 |
| 2 Vinnunevndin | 08.06.2020 | 47/20 | 20/00089-1 |
| 3 Vinnunevndin | 11.03.2021 | 14/21 | 20/00089-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 17.03.2021 | 47/21 | 20/00089-1 |
| 5 Vinnunevndin | 16.09.2021 | 31/21 | 20/00089-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 22.09.2021 | 200/21 | 20/00089-1 |
| 7 Vinnunevndin | 02.12.2021 | 39/21 | 20/00089-1 |
| 8 Vinnunevndin | 13.01.2022 | 3/22 | 20/00089-1 |
| 9 Vinnunevndin | 07.04.2022 | 9/22 | 20/00089-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 20.04.2022 | 113/22 | 20/00089-1 |
| 11 Mentamálanevndin | | | 20/00089-1 |
| 12 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.05.2022 | 122/22 | 20/00089-1 |
| 13 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 03.05.2022 | 25/22 | 20/00089-1 |
| 14 Havnanevndin | 08.06.2022 | 15/22 | 20/00089-1 |
| 15 Býráðsfundur | 25.05.2022 | 114/22 | 20/00089-1 |

**Upprunin til málið:**
Føroyar eru vorðnar kendar sum ferðamannaland. Kommunan skal við einum dagførdum ferðavinnupolitikki tryggja, at ferðavinnan verður ment burðardygt komandi árini.

Vøksturin í ferðavinnuni hevur givið føroyingum fleiri flogleiðir, fleiri møguleikar at gista, nýggjar matstovur og upplivingar. Ferðavinnan er um somuleiðis vorðin ein størri partur av búskapinum.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Tá ið ferðavinnupolitikkurin “Tórshavn sum ferðavinnubýur” varð samtyktur í 2017, vaks ferðafólkatalið nógv, og endamálið við politikkinum var millum annað at rigga kommununa til vøksturin. Politikkurin er galdandi til 2020.

Nógv tiltøk í ferðavinnupolitikkinum eru sett í verk, og nøkur fá tilmæli eru ikki sett í verk enn. Nú er tíðin komin til at gera ein nýggjan politikk við øðrum raðfestingum og tillagingum.

Sambært Visit Faroe Islands keyptu útlendsk ferðafólk í 2018 tænastur og vørur fyri 731 mió.kr. Til samanberingar var talið 460 mió.kr í 2013. Vøksturin frá 2013-2018 hevur verið 59% ella 10% árliga.

Í 2018 vóru 182.279 gistingar, og tað er met. Vøksturin er 3% borðið saman við 2017. Tøl fyri Airbnb og líknandi skipanir eru ikki tald við. Vøksturin hevur verið 38% í tíðarskeiðinum 2013-2018.

Í ár lata fleiri nýggj gistingarhús upp og onnur byggja út. Útboðið verður tvífaldað í 2020. Tað gevur heilt nýggjar møguleikar og eisini avbjóðingar. Ein avbjóðing er at fylla kømrini upp í lágárstíðini, og ein onnur avbjóðing er at fáa nóg nógv starvsfólk í tænastuvinnuna, nú arbeiðsloysið er at kalla einki. Kommunan hevur raðfest vinnuferðavinnu, sum er partur av loysnini uttan fyri háárstíðina.

Matstovuvinnan er nógv ment. Føroyar og Havnin eru nú eitt ferðamál fyri fólk, sum ferðast fyri at eta góðan mat. Serliga hevur KOKS givið Føroyum nógva umrøðu, nú matstovan hevur 2 Michelin stjørnur.

Nógv fólk royna seg á ymsan hátt í ferðavinnuni, og fleiri nýggj tilboð eru til ferðafólk. Hetta síggja vit eisini aftur í øktum eftirspurningi eftir plássum á díkjaraskeiðinum “Nýskapan í ferðavinnuni”, sum Hugskotið og Visit Tórshavn skipa fyri.

Ferðavinnan er á veg til at tryggja ein støðugari búskaparvøkstur í Føroyum, tí ferðavinnan skapar nógv fleiri nýggj størv sammett við aðrar vinnugreinir. Samstundis er ferðavinnan ikki líka tengd at sveiggjum í búskapinum, sum aðrar vinnugreinir.

Ein økt ferðavinna gevur fleiri inntøkur. Ferðavinnan er væl egnað til tess at skapa borgarunum betri trivna og økja áhugan hjá útisetum at flyta heimaftur. Trivnaðurin kann í ein ávísan mun verða treytaður av, at ferðavinnan verður støðugt betri skipað.

Burðardygg ferðavinna fyllir alsamt meira, og arbeitt verður við hesum í Føroyum og aðrastaðni.

Ein framhaldandi vøkstur krevur eitt tætt samskifti við borgararnar – serliga á teimum støðum har vøksturin merkist. Hetta er ein partur av eini burðardyggari ferðavinnu, akkurát sum fíggjarligar og umhvørvisligar burðardyggar loysnir eru týdningarmiklar.

Hvør er leikluturin hjá Tórshavnar kommunu í ferðavinnuni? Hvussu kann kommunan verða ein viðleikari í menningini í ferðavinnuni? Hvat er burðardygg ferðavinna í Tórshavnar kommunu?

Hesir spurningar krevja ein dagførdan ferðavinnupolitikk, sum tekur atlit at broytingunum í ferðavinnuni seinastu fáu árini. Nýggi politikkurin skal fylgja upp upp á og tillaga raðfestingar í mun til karmarnar, sum kommunan skal seta í ferðavinnupolitikkinum.

Mælt verður til at seta ein arbeiðsbólk at orða eitt uppskot til ferðavinnupolitikk.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

Mett verður at útreiðslurnar verða umleið kr. 150.000-250.000, og verður fíggjað av konto 7710.

**Tilmæli:**

Leiðarin á Stjórnarskrivstovuni og kommunustjórin mæla til, at vinnunevndin tekur undir við, at orðaður verður nýggjur ferðavinnupolitikkur fyri 2021-2025.

**Vinnunevndin 10. februar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Beint aftaná samtyktina 10. februar 2020 varð lýst eftir verkætlanarfólki at arbeiða við at orða eitt uppskot til nýggjan ferðavinnupolitikk. Umsóknarfreistin var 16. mars.
Tá freistin var farin, varð alt samfelagið lukkað niður og tí varð skriv sent til umsøkjararnar um at kommunan hevði steðgað setanartilgongdini inntil viðurskiftini eru meira støðug aftur.

Á fundi 28. apríl 2020 varð vinnunevndin kunnað um hetta og at arbeiðsbólkurin vildi seta seg saman, tá samfelagið byrjaði at lata upp aftur.

Arbeiðsbólkin hevur nú havt fund og er komin til, at tað gevur ikki meining at fara undir at gera nýggjan ferðavinnupolitikk, tá alt er so ósikkurt enn, í mun til, nær landið opnar aftur, og fyri hvørjum, hvussu nógv ferðafólk koma henda vegin, og hvussu ferðamynstrið verður í framtíðini.

Eisini verður mælt til, at avlýsa setanina av verkætlanarfólki.
Mælt verður til, at arbeiðið verður tikið upp aftur um ársskifti, tá nýtt býráð hevur tikið við.
Tað merkir, at galdandi ferðavinnupolitikkurin verður galdandi eisini í 2021.

**Tilmæli:**
Leiðarin á Stjórnarskrivstovuni og kommunustjórin mæla til, at vinnunevndin tekur undir við at útseta arbeiðið at orða nýggjan ferðavinnupolitikk til ársskifti 2020-2021, og at setanin av verkætlanarfólki verður avlýst.

**Vinnunevndin 08. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Ferðavinnan hevur av álvara merkt sviðan av vantandi ferðafólki orsakað av Korona. Hóast útlitini í løtuni eru heldur døpur, so verður mett ráðiligt og neyðugt, at ferðavinnan í Tórshavnar kommunu brynjar seg til framtíðina, tá ferðafólkini koma aftur.

Í hesum sambandi er tað av týdningi, at nýggja býráðið setir fokus á, hvussu Tórshavnar kommuna kann viðvirka til framhaldandi menning av ferðavinnuni og hvønn leiklut kommunan eigur at hava í mun til at skapa eina fíggjarliga, sosiala og umhvørvisliga burðardygga ferðavinnu “aftaná” Korona.

Umboð fyri ferðavinnuna hava víst á, at ferðavinnupolitikkurin “Tórshavn - sum ferðavinnubýur” frá 2017 hevur verið eitt gott og neyðugt amboð hjá øllum pørtum, sum arbeiða við ferðavinnu. Arbeitt hevur verið stig – og miðvíst við at seta í verk tilmæltu átøkini og heilt nógv er komið av skafti. Tað eru tó eisini framvegis nógvir møguleikar, sum bíða eftir at verða gagnnýttir.

Partarnir meta, at tað er alneyðugt, at arbeiðið við orða ein nýggja ferðavinnupolitikk fyri Tórshavnar kommunu, verður tikið upp aftur soleiðis, at ferðavinnan og býráðið hava felags mál at arbeiða fram ímóti og eina ætlan fyri, hvussu málini verða rokkin.

**Tilmæli:**

Leiðarin á Stjórnarskrivstovuni og kommunustjórin mæla til, at Vinnunevndin tekur undir við, at arbeiðið við at orða ein ferðavinnupolitikk verður sett í verk aftur.

**Vinnunevndin 11. mars 2021:** Samtykt at taka undir við tilmlinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. mars 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá vinnunevndini.

**Ískoyti:** Sett eru arbeiðsbólkur og verkætlarfólk at orða nýggjan ferðavinnupolitikk fyri komandi árini, og hava hesi gjørt uppskot til arbeiðssetning at arbeiða eftir, j.nr. 20/00089-19.

Arbeiðsbólkurin fer til verka við hesum arbeiðssetningi:
- Arbeiðsbólkurin skal lýsa verandi støðu hjá ferðavinnuni í Tórshavnar kommunu og gera uppskot til nýggjan ferðavinnupolitikk
- Uppskotið til ferðavinnupolitikk skal leggja dent á, hvussu kommunan best kann skapa karmar um eina ferðavinnu, sum er burðardygg sosialt, umhvørvisliga og búskaparliga
- Uppskotið skal gera greitt, hvør er uppgávan hjá ávikavist kommununi og vinnuni í strembanini eftir at skapa eina burðardygga ferðavinnu í høvuðsstaðnum
- Lýsingin og tilmælini skulu vera grundað á viðkomandi hagtøl, kanningar og frágreiðingar. Gjøgnum samskifti við borgarar, vinnulív, áhugabólkar og onnur skal arbeiðsbólkurin tryggja, at sjónarmiðini hjá ymsu pørtunum verða viðgjørd í arbeiðinum at orða ferðavinnupolitikkin.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og deildarleiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla til at taka undir við uppskotinum til arbeiðssetning at orða nýggjan ferðavinnupolitikk fyri komandi árini.

**Vinnunevndin 16. september 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. september 2021:** Samtykt at taka undir við Vinnunevndini.

**Ískoyti:**
Kunnað verður á fundinum um status.

**Vinnunevndin 02. desember 2021:** Útsett.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um málið.

**Vinnunevndin 13. januar 2022:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Uppskotið til ferðavinnupolitik 2022-2026 er liðugt.

Heitið á ferðavinnupolitikkinum er «Fólk og ferðavinna lið um lið» og grundarlagið undir politikkinum er, at Tórshavnar kommuna fyrst og fremst skal vera eitt gott stað at búgva - í dag, um fimm ár og hjá komandi ættarliðum.

Málið er, at í 2030, er Tórshavnar kommuna tann besta kommunan í Norðurlondum at búgva í og vitja.

Tilmælini í ferðavinnupolitikkinum leggja seg eftir at:
- tryggja góða javnvág millum búgvandi og vitjandi
- skapa umstøður til eitt kveikjandi mentanarlív
- geva møguleika til grønu og endurskapandi valini

Harumframt leggur ferðavinnupolitikkurin seg upp at hesum av heimsmálum hjá ST:

- 3. Góð heilsa og vælferð
- 4. Dygdargóð útbúgving
- 5. Javnstøða millum kyn
- 7. Burðardygg orka
- 8. Sømiligt arbeiði og búskaparvøkstur
- 11. Burðardyggir býir og býlingar
- 12. Ábyrgdarfull nýtsla og framleiðsla
- 13. Veðurlagsátøk
- 15. Lív á landi

**Tilmælini:**
Ferðavinnupolitikkurin er býttur upp í 3 høvuðstilmæli og undir hvørjum høvuðstilmæli eru onnur tilmæli um átøk, sum skulu fremjast fyri.

**Tilmælini eru:**

**Styrkja góða javnvág millum búgvandi og vitjandi**

- STYRKJA VINNUFERÐAVINNUNA
- STYRKJA VISIT TÓRSHAVN
- FERÐAVINNUÚTBÚGVINGAR Í HAVN
- NEYVARI FERÐAVINNUHAGTØL
- STYRKJA SAMSKIFTIÐ VIÐ FERÐAVINNUNA
- HJÚKLA UM SMÁAR AKTØRAR
- BETRI FERÐASAMBAND TIL OYGGJARNAR
- VESI, SKJÓL OG SKELTI
- FERÐAVINNA FYRI ALLA KOMMUNUNA
- BÝARLÍV
- CRUISEVINNAN SKIPAST
- ATKOMA FYRI ØLL

**Kveikjandi mentanarlív**

- ORÐA MENTANARPOLITIKK
- EVROPEISKUR MENTANARHØVUÐSSTAÐUR
- SPENNANDI SØVN
- VARÐVEITA OG VERJA FORNMINNI
- STUÐLA KOLTURSÆTLANINi
- 

**Grønt ferðamál**

- NÁTTÚRULÍV
- FERÐ Á GRØNA SKIFTIÐ
- HÆGRI STIG Í GDS-INDEKSINUM
- GRØNARI GISTINGARHÚS OG MATSTOVUR
- BETRI MØGULEIKAR AT SKILJA
- GRØN KAMPING
- TJALDING OG SKÝLI
- KUNNING UM GØTURNAR
- KENNA VIRKSEMIÐ Í HAGANUM

Endamálið við átøkunum er at styrkja ferðavinnuna í Tórshavnar kommunu og samanspælið við borgarar, umhvørvi og mentanina. Grundgivið verður fyri hvørjum átaki, og hvør, ið hevur ábyrgdina av at seta tað í verk. Eisini er kostnaðarmeting gjørd av átøkunum, har tað er gjørligt og tíðarætlan fyri nær átøkini skulu fremjast.

**Tilgongdin**

Frágreiðingar, hagtøl og ferðavinnukanningar, sum eru gjørd, eru brúkt sum grundarlag undir ferðavinnupolitikkinum. Samskiparin hevur orðað eitt álit, sum er grundarlag undir politikkinum. Høvuðsdentur er tó lagdur á borgarar og ferðavinnuaktørar í kommununi.

Samskiparin hevur tosað við eina røð av borgarum, ferðavinnuaktørum og vinnurekandi í kommununi. Dentur er lagdur á at fevna víða bæði í mun til aldur, kyn og hvar í kommununi tú býrt. Eisini eru samrøður gjørdar við stovnar, myndugleikar, áhugabólkar umframt staðbundnu nevndirnar í Tórshavnar kommunu. Skipað hevur verið fyri fokusbólkasamrøðum.

Arbeiðsbólkurin hevur havt nógvar fundir, bæði arbeiðsfundir og fundir við viðkomandi partar. Uppskotið til ferðavinnupolitik er eisini umrøtt saman við viðkomandi deildir og stjórar innanhýsis í kommununi.

**Fíggjarligar avleiðingar.**

Ferðavinnupolitikkurin kostar í sjálvum sær onki. Men skal politikkurin fremjast í verki, er avgerandi, at kommunan setur neyðuga játtan og arbeiðsorku av til átøkini komandi árini.

Visit Tórshavn hevur ein týdningarmiklan leiklut at menna og branda lokalu ferðavinnuna í kommununi og at íverkseta tilmælini í ferðavinnupolitikkinum.
Umráðandi er, at Visit Tórshavn hevur neyðugu karmarnar til hesa uppgávuna.

Tá politisk støða er tikin til einstøku tilmælini, og arbeiðið at íverkseta politikkin av álvara fer í gongd, verða neyvari metingar gjørdar av fíggjarligu avleiðingunum og lagdar til viðkomandi nevndir til støðutakan.

Í mun nøkur tilmæli verður lagt upp til eina longri tilgongd har kommunan yvir nøkur ár setur av neyðuga játtan og starvsfólkaorku til tess at fremja tey í verki. Onnur tilmæli fevna um ítøkilig viðurskifti.

Talan er í ein ávísan mun um átøk, sum fevna um virkisøki hjá fleiri deildum í kommununi. Í øðrum førum er talan um at hækka játtanina til ein ávísan stovn.

Fleiri av tilmælunum fevna um átøk, sum aðrir myndugleikar og ofta fleiri, skulu fremja. Tað er til eina og hvørja tíð upp til myndugleikarnir at taka støðu til, um tilmælini skulu fremjast og hvussu karmarnar skulu skipast bæði bygnaðarliga, starvsfólkaliga og fíggjarliga.

**Tilmæli**
Deildarleiðarin á Stjórnarskrivstovuni og kommunustjórin mæla til at tikið verður undir við uppskotinum til ferðavinnupolitikk.

**Vinnunevndin 07. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við ferðavinnupolitikkinum og at beina málið í mentamálanevndina, byggi- og býarskipanarnevndina, náttúru- og umhørvisnevndina og havnanevndina til kunningar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. mai 2022:** Kunnað varð um málið.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 03. mai 2022:** Kunnað varð um málið.

**Býráðsfundur 25. mai 2022:** Málið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri, ongari ímóti og einari blankari.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Birita B. Iversen, Bjørg Dam, Elsa Berg, Jákup Dam, Jón Kragesteen, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Blankt atkvøddi: Kári Johansen

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>25. mai 2022 | Blað nr.: 487<br>Formansins merki: |

# 115/22 Eykajáttan til konto 5370 stuðul til íløgur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 11.05.2022 | 134/22 | 22/02292-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.05.2022 | 126/22 | 22/02292-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 24.05.2022 | 144/22 | 22/02292-1 |
| 4 Býráðsfundur | 25.05.2022 | 115/22 | 22/02292-1 |

**Upprunin til málið**
Annfinn Brekkstein, formaður, setir fram uppskot um eykajáttan.

**Lýsing av málinum**
Fleiri felagsskapir hava síðsta árið søkt kommunua um íløgustuðul til bygging, útbygging og dagføring av bygningum v.m., sum ítróttafeløg og frítíðarfelagsskapir standa fyri.

Á stuðulsjáttanini 5370 Stuðul til íløgur er játtan ikki tøk til at avgreiða umsóknirnar.

Skotið verður tí upp at játta kr. 2,7 mió sum eykajáttan til kontu 5370 stuðul til íløgur fíggjað soleiðis:

- kr. 1,5 mió av løgukarmi LK57033 skjótibreyt
- kr. 1,2 mió av løgukontu L55001 Tórshavnar Býarsavn.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin mælir nevndini til at taka støðu til uppskotið.

**Mentamálanevndin 11. mai 2022**: Ein meiriluti, Annfinn Brekkstein, Súna Mørk og Kristianna Winther Poulsen, samtykkir at játta kr. 1,5 mió av løgukarmi LK57033 Skjótibreyt og kr. 1,2 mió av løgukontu L55001 Tórshavnar býarsavn at flyta á kontu 5370 stuðul til íløgur.

Ein minniluti, Annika Olsen og Ruth Vang, tekur ikki undir við uppskotinum.

Málið verður um fíggjarnevndina beint í býráðið til tvær viðgerðir.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2022:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 24. mai 2022:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini við teirri broyting, at játtaðar verða:

1,5 mió. kr. av L55001 Tórshavnar býarsavn
0,320 mió. kr. av LK57033 Skjótibreyt
1,180 av L27012 Nýtt røktarheim við røktaríbúðum

Íalt 2,7 mió. kr. á konto 5370 stuðul til iløgur.

Málið beint í býráðið sum eykajáttan, ið krevur tvær viðgerðir.

Elsa Berg luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 25. mai 2022:** Samtykt við fyrru viðgerð við 11 atkvøðum, tveimum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyi atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Birita Baldvinsdóttir, Bjørg Dam, Jákup Dam, Jón Kragesteen, Annika Olsen og Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg og Ruth Vang.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

# 116/22 Skúlin á Fløtum - undirvísingarhøli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 12.05.2022 | 40/22 | 22/01951-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.05.2022 | 125/22 | 22/01951-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 24.05.2022 | 143/22 | 22/01951-1 |
| 4 Býráðsfundur | 25.05.2022 | 116/22 | 22/01951-1 |

**Upprunin til málið**
Tørvur á fleiri undirvísingarhølum vegna størri tal av flokkum.

**Lýsing av málinum**
Í samráð við skúlaleiðsluna hevur møguleikin verið umrøddur at byggja um verandi auditorii í útsynningshorninum móti parkeringsplássinum í Oyggj 7.

Verandi auditorii er dupulthøgt rúm. Umbyggingin hevur til endamáls at taka niður verandi uppbygging, leggja nýtt dekk í, umleggja tekniskar leiðingar og síðani byggja um til tvær nýggjar skúlastovur.

Nýggju stovurnar verða bygdar í sama sniði og dygd sum verandi stovur í skúlanum. Útveggirnir verða óbroyttir.

Skúlans leiðsla tekur undir við uppskotinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Biðið er um óbindandi tilboð frá arbeiðstakara, sum bygdi skúlan (Articon/Búsetur). Við ókendum, mvg v.m. er talan um kostnað uml. kr. 1,82 mió.

Játtan er ikki til endamálið í íløguætlanini 2022 grein 4.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Broytingin krevur dagført byggiloyvi. Við avhending av umbyggingararbeiðinum skal broytingin sýnast áðrenn nýtslutøku. Byggimálsdeildin er kunnað um broytingina og skal hava dagførdar tekningar við vm.

**Skjøl**
Kostnaðarmeting og arbeiðstakarans tilboð
Myndir av økjum, ið skulu umbyggjast.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og leiðarin á bygningsdeildini mæla trivnaðarnevndini til at taka støðu til, um ætlanin skal fremjast, og um so er, at játtan kr. 1.820.000 verður fingin til vega. Samstundis verður mælt til at heimila umsitingini at fara í endaligar samráðingar og gera arbeiðstøkusáttmála við Articon/Búsetur á kr. 1.362.735,00 u/mvg. Málið at beina í fíggjarnevnd og býráð.

**Trivnaðarnevndin 12. mai 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og heita á fíggjarnevndina um at ávísa fígging og beina málið í býráðið.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2022:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 24. mai 2022:** Samtykt at taka undir við at fremja ætlanina og játta kr. 1.820.000,00 av konto L27012 Nýtt røktarheim við røktaríbúðum sum eykajáttan, ið krevur tvær viðgerðir, til nýtt projekt til verkætlanina.

**Býráðsfundur 25. mai 2022:** Einmælt samtykt við fyrru viðgerð.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

## 117/22 Eftirmeting av sernámsfrøðiliga økinum í fólkaskúlunum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 08.05.2019 | 152/19 | 18/04396-3 |
| 2 Mentamálanevndin | 07.06.2019 | 187/19 | 18/04396-3 |
| 3 Mentamálanevndin | 15.01.2020 | 10/20 | 18/04396-3 |
| 4 Mentamálanevndin | 21.01.2020 | 31/20 | 18/04396-3 |
| 5 Mentamálanevndin | 15.04.2020 | 112/20 | 18/04396-3 |
| 6 Mentamálanevndin | 13.05.2020 | 130/20 | 18/04396-3 |
| 7 Mentamálanevndin | 10.06.2020 | 169/20 | 18/04396-3 |
| 8 Fíggjarnevndin | 17.06.2020 | 175/20 | 18/04396-3 |
| 9 Mentamálanevndin | 09.09.2020 | 229/20 | 18/04396-3 |
| 10 Trivnaðarnevndin | 11.03.2021 | 19/21 | 18/04396-3 |
| 11 Trivnaðarnevndin | 06.05.2021 | 36/21 | 18/04396-3 |
| 12 Trivnaðarnevndin | 10.06.2021 | 42/21 | 18/04396-3 |
| 13 Trivnaðarnevndin | 07.10.2021 | 65/21 | 18/04396-3 |
| 14 Trivnaðarnevndin | 29.11.2021 | 92/21 | 18/04396-3 |
| 15 Trivnaðarnevndin | 10.02.2022 | 10/22 | 18/04396-3 |
| 16 Trivnaðarnevndin | 07.04.2022 | 28/22 | 18/04396-3 |
| 17 Trivnaðarnevndin | 12.05.2022 | 42/22 | 18/04396-3 |
| 18 Fíggjarnevndin | 18.05.2022 | 127/22 | 18/04396-3 |
| 19 Býráðsfundur | 25.05.2022 | 117/22 | 18/04396-3 |
| 20 Býráðsfundur | | | 18/04396-3 |

**Upprunin til málið:**
Mentamáldeildin og fundir um evnið

**Lýsing av málinum**
Mentamáladeildin hevur havt fund við partar sum varða av sernámsfrøðiliga økinum, og hvørji atlit Tórshavnar kommuna eigur at taka viðvíkjandi hølisviðurskiftum. Endamálið við fundinum var at fáa lýst økið og fáa greiði á ymsum viðurskiftum, sum ávirka rakstur og hølistørv til økið. Evnini, sum vórðu viðgjørd, eru málsetningar fyri sertilboðini, sum eru í Tórshavnar kommunu, hvørji atlit skulu takast viðvíkjandi bygningum, eftirmeting av økinum, og leikluturin hjá Sernámi og hjá Skúlanum á Trøðni.

4-10 er í Skúlanum á Fløtum - eindini við Landavegin í bygningi fyri seg. Tilboðið er ætlað næmingum í 4.-10. fl., sum ikki rúmast í einum vanligum flokki, tí at ólagið ella trupulleikin hjá næminginum, krevur eina undirvísing og ein pedagogik, sum torført er at fremja í verki í einum vanligum flokki. Tilboðið er lýst, men tann lýsingin eigur at verða dagførd

Í Hoyvíkar skúla er tilboð til næmingar við autismu. Tilboðið er til næmingar í 1.-9.fl. og næmingarnir í grunddeildini ganga eisini í Frítíðarskúlan í Hoyvík. Eingin lýsing er av tilboðnum.

Lopfjølin heldur til í Margarinfabrikkini og er ætlað næmingum, sum av sosialum ella psykiskum orsøkum ikki megna vanliga skúlagongd og aftra seg við ella ikki koma í skúla. Endamálið er, at næmingarnir taka fráfaringarroynd fólkaskúlans. Tilboðið er til næmingar í 7.-10. fl. lýsing er av Lopfjølini, og hon verður eftirmett nú.

Í Sankta Frans skúla er tilboð til næmingar við orðblindni. Tilboðið er til næmingar 3.- 7. fl.

Ætlanin er at halda fram at samskifta við ymsu partarnar við tí endamálið at fáa lýsing av øllum tilboðunum, at visitatónsreglurnar eru sjónligar, so foreldur, starvsfólk í skúlum og stovnum og myndugleikar kenna mannagongdirnar viðvíkjandi upptøku í ymsu tilboðini. Haraftrat er neyðugt, at greitt er, hvør tørvur er á sertilboðum í Tórshavnar kommunu. t.d. eftirlýsa skúlaleiðarar einum tilboði til børn í 0.-3. flokki og Undirvísingarstýrið hevur munnligan fyrispurning um pláss er til eitt tilboð til uml. 30 næmingar í einum á av fólkaskúlunum í kommununi.

Tá sertilboð er til børn í 0.- 3. flokki er talan bæði um skúla og frítíðarskúla, og tí er neyðugt at tilboðið er bæði í skúla og frítíðarskúla.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Fólkaskúlalógin § 45 stk. 6

**Upplýsingar frá umsitingini**
Einki at viðmerkja

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Einki at viðmerkja

**Møgulig frávik/léttar frá ásetingum**
Einki at viðmerkja

**Umhvørvisárin**
Einki at viðmerkja

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ongar

**Skjøl**
Frágreiðing frá fundi um sernámsfrøðiliga økið.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Kunnað verður um málið.

**Mentamálanevndin 08. mai 2019:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti**

**Upprunin til málið:**
Mentamáldeildin og fundir um evnið

**Lýsing av málinum**
Mentamáladeildin hevur havt fund við partar sum varða av sernámsfrøðiliga økinum, og hvørji atlit Tórshavnar kommuna eigur at taka viðvíkjandi hølisviðurskiftum. Endamálið við fundinum var at fáa lýst økið og fáa greiði á ymsum viðurskiftum, sum ávirka rakstur og hølistørv til økið. Evnini, sum vórðu viðgjørd, eru málsetningar fyri sertilboðini, sum eru í Tórshavnar kommunu, hvørji atlit skulu takast viðvíkjandi bygningum, eftirmeting av økinum, og leikluturin hjá Sernámi og hjá Skúlanum á Trøðni.

4-10 er í Skúlanum á Fløtum - eindini við Landavegin í bygningi fyri seg. Tilboðið er ætlað næmingum í 4.-10. fl., sum ikki rúmast í einum vanligum flokki, tí at ólagið ella trupulleikin hjá næminginum, krevur eina undirvísing og ein pedagogik, sum torført er at fremja í verki í einum vanligum flokki. Tilboðið er lýst, men tann lýsingin eigur at verða dagførd

Í Hoyvíkar skúla er tilboð til næmingar við autismu. Tilboðið er til næmingar í 1.-9.fl. og næmingarnir í grunddeildini ganga eisini í Frítíðarskúlan í Hoyvík. Eingin lýsing er av tilboðnum.

Lopfjølin heldur til í Margarinfabrikkini og er ætlað næmingum, sum av sosialum ella psykiskum orsøkum ikki megna vanliga skúlagongd og aftra seg við ella ikki koma í skúla. Endamálið er, at næmingarnir taka fráfaringarroynd fólkaskúlans. Tilboðið er til næmingar í 7.-10. fl. lýsing er av Lopfjølini, og hon verður eftirmett nú.

Í Sankta Frans skúla er tilboð til næmingar við orðblindni. Tilboðið er til næmingar 3.- 7. fl.

Ætlanin er at halda fram at samskifta við ymsu partarnar við tí endamálið at fáa lýsing av øllum tilboðunum, at visitatónsreglurnar eru sjónligar, so foreldur, starvsfólk í skúlum og stovnum og myndugleikar kenna mannagongdirnar viðvíkjandi upptøku í ymsu tilboðini. Haraftrat er neyðugt, at greitt

er, hvør tørvur er á sertilboðum í Tórshavnar kommunu. t.d. eftirlýsa skúlaleiðarar einum tilboði til børn í 0.-3. flokki og Undirvísingarstýrið hevur munnligan fyrispurning um pláss er til eitt tilboð til uml. 30 næmingar í einum á av fólkaskúlunum í kommununi.

Tá sertilboð er til børn í 0.- 3. flokki er talan bæði um skúla og frítíðarskúla, og tí er neyðugt at tilboðið er bæði í skúla og frítíðarskúla.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Fólkaskúlalógin § 45 stk. 6

**Upplýsingar frá umsitingini**
Einki at viðmerkja

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Einki at viðmerkja

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Einki at viðmerkja

**Umhvørvisárin**
Einki at viðmerkja

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ongar

**Skjøl**
Frágreiðing frá fundi um sernámsfrøðiliga økið.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Kunnað verður um málið.

**Ískoyti**
Ein virknaðareftirmeting er gjørd av Lopfjølini. Tað er Mentamálaráðið, sum hevur biðið um hesa eftirmeting. Endamálið við eftirmetingini var at fáa staðfest, í hvønn mun málini fyri skúlatilboðið eru rokkin, og um tað er grundarlag fyri menning av tílíkum tilboðum.

Niðurstøðan í kanningini er, at tað er tørvur á tílíkum tilboðið, og at virksemið á Lopfjølini hevur positiva ávirkan á næmingarnar. Teir flestu hava fingið eitt fólkaskúlaprógv, og útlitini eru góð fyri, at teir eftir lokna gongd á Lopfjølini halda fram móri víðari útbúgving og/ella arbeiði.

Samstarv og samskifti millum fólkaskúlan og Lopfjølina er vantandi.

Innanhýsis í Lopfjølini er gott samskifti og samstarv.

Tilmælini eru, at Lopfjølin heldur fram, at lýsingin av tilboðnum skal endurskoðast, at tímatalið verður hækkað, at tilboðið verður til næmingar úr 5. – 9. flokk., at tað ikki er treyt, at næmingurin er í barnaverndarvirkisøki, samstarvið millum upprunaskúla og Lopfjølina verður styrkt og at kunnað verður um Lopfjølina.
Eftirmetingin er hjáløgd

**Tilmæli:**
Kunnað verður um málið

**Mentamálanevndin 07. juni 2019:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Í heyst var verkstova um sernámsfrøðiliga økið. Frágreiðing frá verkstovuni er hjáløgd.

Í desember var fundur um støðuna og akutta tørvin. Á fundinum vóru umboð fyri Undirvísingarstýrið, Sernám og Tórshavnar kommunu. Umsitingin (barna- og ungdómsdeildin og mentamáladeildin) hava fund í januar, um m.a. tørvin á plássum og lýsing av heildartilboði, tvs. sertilboði, sum fatar um bæði skúla og frítíðarskúla.

Freistin fyri innskriving er 16. januar og stutt eftir, at freistin er farin ber til at siga, hvussu nógv børn, sum eru innskrivað, hava tørv á sertilboði. Væntandi eru tey eini fimm børn, sum hava akuttan tørv, og so eru nøkur aftrat.

**Komandi skúlaár**
Viðvíkjandi hølum til komandi skúlaár hevur umsitingin umrøtt hesar møguleikar:

a. fyribilshøli við Eysturskúlan, talan kann vera um fýra flokshøli, sum vanligir flokkar flyta út í, og so kann sertilboð vera inni í skúlanum.
b. fyribilshøli í garðinum í Eindini við Landavegin hjá Skúlanum á Fløtum (Ytra skúla), so kann 4-10 tilboðið víðkast til at umfata børn frá forskúla/fyrsta flokki til og við 10. flokki.
c. Lon 4 (ovara hæddin) á Frælsinum, sum kann vera til annan málbólk enn tann í 4-10 og samstarva við 4-10 tilboðið.
d. Lon 4 og lon 7, har eru 10 flokshøli, tvær skrivstovur, starvsfólkarúm, bókasavn, trý bólkarúm, goymslurúm, fimleikahøll og í niðaru hæddini í lon 7 eru høli til handaverk og list.
e. Lon 7 til sertilboð, men um lon 4 ikki er við, so skal lon 7 tillagast til tørvin.
f. Nám X flytur út á Frælsið, og sertilboð verður í hølunum hjá Nám X í Eysturskúlanum.

Stutt frágreiðing um nevndu møguleikar.

a.
Fyribilshølini talan kann vera um, eru tey, sum verða brúkt til Skúlan á Fløtum, byggingina. Um henda loysn verður vald, fara fýra flokkar í Eysturskúlanum at hava hesi høli til flokstovur, og so fær eitt sertilboð høli inni í skúlanum. Hetta sertilboð verður stovnað undir leiðsluni í Eysurskúlanum, og kann t.d. vera eitt tilboð fyri yngri næmingar, forskúla til við 3. flokki.

b.
Fyribilshølini talan kann vera um, eru tey sum verða brúkt til Skúlan á Fløtum, byggingina, ella tey, sum eru í garðinum hjá frk. Cohr. Verður hetta loysnin, verður 4- 10 tilboðið útbygt til at umfata forskúla til og við 10. flokki, og tilboðið verður framhaldandi undir leiðsluni í Skúlanum á Fløtum.

c.

Um lon 4 verður brúkt til sertilboð, ber ikki til at hava frítíðarvirksemi har, tó ber kanska til, at Havnar Dartfelag fær høli í kjallaranum, men tað krevur, at ventilatión verður gjørd har. Sum er verða hølini í kjallaranum í lon 4 bert brúkt til goymslu.

d.
Um talan verður um lon 4 og 7 á Frælsinum er neyðugt at gera ein sáttmála við landið, sum í minsta lagi er galdandi í fimm ár. Um bæði lon 4 og lon 7 verða tøk til sertiboð, verður 4-10 flutt úr eindini við Landavegin og nýggj størri eind, sum umfatar allar árgangirnar, verður skipað á á Frælsinum undir leiðslu av Skúlanum á Fløtum. Eindin kann so býtast sundur í tveir ella tríggjar aldursbóllkar, ella í tveir bólkar eftir, hvør tørvurin hjá næmingunum er.

Frítíðarskúlin í Kongagøtu hevur eina eind í leigaðum hølum á Frælsinum. Í hesi eind eru nøkur børn, sum ganga í Skúlanum á Trøðni. Um sertilboð verða í lon 4 og lon 7 á Frælsinum, hevði borið til at brúkt høli har til henda partin av frítíðarskúlanum, og so sagt leigumálið upp.

Um farið verður úr eindini hjá Skúlanum á Fløtum við Landavegin, verður bygningurin tøkur til onnur endamál, og tað kundi so verið til onkrar av frítíðarfelagsskapunum, sum hava verið frammi í sambandi við bygningin á Frælsinum. Haraftrat kann talan vera um Skansastovu til onkrar av hesum felagsskapum.

e.
Um talan bert verður um lon 7 er neyðugt at gera ymsar tillagingar, t.d. til starvsfólkahøli, og talan kann so antin verða um eitt tilboð aftrat ella til 4-10, sum so fær tikið eitt sindur fleiri næmingar.

f.
Um Nám X flytur út á Frælsið verður neyðugt at gera ein sáttmála við landið um lon 7 umframt onnur serhøli í bygninginum. Um Nám X flytur út ber til at skipa eitt stórt sertilboð í Eysturskúlanum, sum verður undir leiðsluni í skúlanum.

**Langtíðarloysnir**
Tær langtíðarlosynir, sum eru eyðsýndar eru:
- at Nám X flytur út á Argir, og so verða høli tøk í Eysturskúlanum.
- í sambandi við høvuðsumvæling av Hoyvíkar skúla, verður skúlin útbygdur, so pláss verður fyri einum sertilboði aftrat ella fyri einum størri tilboði fyri næmingar við autismu
- at byggja Eysturskúlan út, so pláss verður fyri einum sertilboði har.

**Fíggjarligar avleiðingar**
Viðvíkjandi fyribilshølum er avgerandi um til ber at nýta hølini, sum Tórshavnar kommunu longu eigur. Kostnaðurin aftrat verður so fyri flyting og fundament umframt tillaging av hølum.

Viðvíkjandi bygninginum á Frælsinum verður neyðugt at økja um viðlíkahaldsútreiðslurnar av lon 4 og saman við Landsverki økja útreiðslurnar til viðlíkahald fyri tann partin, sum er felagsogn, og haraftrat gera nýggjan sáttmála og avtalu við landið um møguliga leigu. Harumframt er ætlanin um gerðabýti við landið um bygningin í sambandi við kampusætlanina.

Aftrat hesum verða stovningarútreiðslur til fleiri serflokkar umframt rakstrarútreiðslur til hesar flokkar.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða málið við atliti til, at umsitingin kemur við endaligum tilmæli til fundin 5. feb. 2020.

**Mentamálanevndin 15. januar 2020:** Tikið av skrá.

**Mentamálanevndin 21. januar 2020:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Umboð fyri Mentamáladeildina, Barna- og ungdómsdeildina og Húsaumsitingina hava verið á fundi við leiðsluna í Eysturskúlanum og hugt at umstøðunum har. Tosað varð um at flyta fyribilshølini, sum eru í garðinum hjá frk. Cohr niðan til Eysturskúlan, so til ber at skipa eitt sertilboð til børn í forskúla til og við 3. flokki í skúlanum. Í løtuni eru tríggir næmingar í fyrsta flokki í Eysturskúlanum í lonunum í Hoydølum meginpartin av skúladegnum.

Tørvur er á fleiri plássum í sertilboðum í Tórshavnar kommunu, og mett verður, at tað er umráðandi at skipa eitt skúla- og frítíðarskúlatilboð til tey yngstu børnini líknandi tilboðnum, sum er í Skúlanum á Fløtum til næmingar í 4. til og við 10. flokki. Tilboðið í Skúlanum á Fløtum er tó bert eitt skúlatilboð, einki skipað frítíðartilboð er til 4-10.

Á fundinum vísti leiðslan í Eysturskúlanum á møguleikan, at um fyribilshølini í garðinum hjá frk. Cohr verða flutt niðan til Eysturskúlan, so kunnu hølini verða til lærugreinina náttúru og tøkni, og eitt sertilboð kann so skipast í hølunum í A-lonini, sum verða brúkt til náttúru og tøkni í dag. Hølini eru beint við førleikastovuna og í sernámsfrøðiliga økinum hjá skúlanum.

Fyrimunirnir við at skipa eitt sertilboð inni í einum skúla eru, at tilboðið er tættari at skúlanum, at næmingarnir eru ein partur av skúlanum, næmingarnir hava størri møguleika at kenna seg sum ein part av felagsskapinum, starvsfólkini eru ikki í bygningi fyri seg, men partur av starvsfólkahópinum, og leiðslan er á staðnum.

Mett verður, at uml. fimm børn, sum eru innskrivað í fyrsta flokk skúlaárið 2020/21, hava tørv á serligum tilboði. Um eitt sertilboð til 1. – 3. flokk verður í Eysturskúlanum, verður tað til uml. 15 børn, ætlanin er tó ikki at byrja við so nógvum, men heldur taka børn inn so við og við, so tað um eini tvey ár er komið upp á fult næmingatal.

Tey fyrstu árini verður bert talan um børn í 1.- 3. flokki, ætlanin er so, at seinni kann sertilboðið víðkast til at fevna um forskúlabørn eisini.

Hugt var at økinum við Eysturskúlan, og mett var, at fyribilshølini kundu verið sett upp í skúlagarðinum við A-lonina móti Djóna í Geilgøtu. Kostnaðarmetingin at flyta hølini, gera fundament, seta tey upp aftur við Eysturskúlan og gera neyðugar installatiónir er 650.000 kr.

Kostnaðarmetingin at laga hølini inni í skúlanum slíkt sertilboð er er 60.000 kr., talan er í hesum sambandi um at seta ein vegg upp og seta hurð í, sum gongur út í garðin. Aftrat hesum er tørvur á innbúgvi, útgerð og tilfarið til bólkin, mettur kostnaður fyri tað er 165.000 kr.

Leigumálið um lonirnar í Hoydølum er galdandi til 31. desember 2020, tí kann tilboðið vera í Hoydølum hetta árið út. Men best er, um til ber at flyta í Eysturskúlan sum skjótast. Frítíðarskúlin í Kongagøtu brúkar fyribilshølini, og verða tey sostatt ikki tøk fyrrenn flutt er í nýggja bygningin úti á Fløtum í summar. Tað kann verða ein avbjóðing at fáa hølini flutt og tøk hjá Eysturskúlanum at taka í nýtslu til skúlaársbyrjan í august. Tað er óivað meir sannlíkt, at hølini kunnu vera liðug eftir heystfrítíðina í oktober.

Frítíðarskúlin hjá børnunum í sertilboðnum er Smílibýlið. Ætlanin er, at frítíðarskúlin Smílibýlið brúkar fyribilshølini seinnapart, tá skúlavirksemið eru liðugt, Tað eru næmingar í 4.- 6- árgangi, sum hava náttúru og tøkni Um hølini verða innrættað til lærugreinina náttúru og tøkni, ber eisini væl til hjá frítíðarskúlanum at skipa virksemið har við denti á náttúruna.

Ætlanin er at gera leiðreglu um sertilboðið líknandi henni, sum eru galdandi fyri tilboðið, ið er í Eysturskúlanum hetta skúlaárið (í lonunum í Hoydølum). Samstarvspartarnir eru Eysturskúlin, Barna- og ungdómsdeildin, Mentamáladeildin, Undirvísingarstýrið/ Uttanríkis- og mentamálaráðið og Sernám.

Nýggi parturin av Argja skúla verður eisini tøkur, tá Skúlin á Fløtum flytur í nýggja skúlan. Har ber til at skipa sertilboð, og talan kundi so verið um, at 4-10 fer úr skúlabygninginum við Landavegin (Gula skúla) og út á Argir. Tilboðið hevði so verið víðkað til næmingar í grunddeildini og verið til uml. 60 næmingar, sum vóru býttir í tríggjar deildir, grund-, mið- og hádeild. Hetta kundi verið ein fyribilsloysn í eini 5 ár, og sertilboðið hevði hildið fram undir leiðsluni í Skúlanum á Fløtum.

Arbeitt eigur at verða fram ímóti, at sertilboð í mest møguligan mun verða inni í skúlum, tí verður mett skilabest at skipa sertilboð til yngru næmingarnar í Eysturskúlanum og undir leiðsluni har. Tað er eisini umráðandi, at sertilboðini ikki blíva ov stór, tí tað er avmarkað, hvussu nógvir næmingarnir kunnu vera í einum skúla, áðrenn tað fyllir ov nógv í vanliga gerandisdegnum í skúlanum.

Kostnaðarmetingin at skipa sertilboð til grunddeild í Eysturskúlanum er 815.000 kr. Sí hjálagda kostnaðarmeting.

Um samtykt verður at seta á stovn serrtilboð í Eysturskúlanum, verður málið lagt fyri aftur á næsta fundi í mentamálanevndini við tilmæli um fígging og leiðreglu/samstarvsskjali fyri skipanina.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla mentamálanevndini til at samtykkja at seta á stovn sertilboð til grunddeild í Eysturskúlanum og at farið verður undir endaligar fyrireikingar at skipa tilboðið.

**Mentamálanevndin 15. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Víst verður til hjáløgdu kostnaðarmeting. Umsitingin hevur mett um møguleikar fyri fígging og vil mæla til at verkætlanin verður fíggjað av fylgjandi kontum:

Konta 4140 Ætlanir á skúlaøkinum – 275 tkr. (tøkt at raðfesta)
Konta 4113 Velbastaðar skúli – 50 tkr. (minni tørvur)
Konta 4175 Dagføring av skúlum 158 tkr. (játtan áður ætlað til gerð av byggiskrá til framtíðar høvuðsumvæling v.m. av Hoyvíkar skúla. Er ikki aktuelt í 2020).
Konta 4124 Frískúlin í Havn 275 tkr. (minni tørvur)
Tilsamans 758 tkr.

Samstarvsskipan o.a.
Leiðreglur/samstarvsskjal millum avvarðandi partar og gjøllari lýsing av tilboðnum verður lagt fyri nevndina til komandi fund. Støðið verður tikið í leiðregluni frá í fjør-

Hoyring av skúlastýrinun í Eysturskúlanum
Av tí at talan er um ávísar broytingar í undirvísingarligum og praktiskum viðurskiftum í skúlanum eigur málið at vera sent til ummælis í skúlastýrinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:
a). at senda ætlanina til ummælis hjá skúlastýrinum í Eysturskúlanum
og
at tilboðið til 1.-3.flokk í Eysturskúlanum verður fíggjað við at flyta:
b). 50 tkr. av kontu 4113 til kontu 4140 Ætlanir á skúlaøkinum
c). 50 tkr. av kontu 4113 Velbastaðar skúli til kontu 4140 Ætlanir á skúlaøkinum
d). 158 tkr. av kontu 4175 Dagføring av skúlum til kontu 4140 Ætlanir á skúlaøkinum
e). 275 tkr. av kontu 4124 Frískúlin í Havn til kontu 4140 Ætlanir á skúlaøkinum

Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 13. mai 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Ískoyti**
Ætlanin at skipa sertilboð er send skúlastýrinum í Eysturskúlanum til ummælis. Svarið frá foreldraumboðunum í skúlastýrinum er hjálagt.

Skúlastýrið mælir frá, at fyribilshøli verða sett upp í skúlagarðinum í Eysturskúlanum, men staðfestir tó, at tað er tørvur á tílíkum tilboði í Tórshavnar kommunu, og at bæði leiðsla og starvsfólk í skúlanum rúma væl hesum tilboði.

Grundgevingarnar fyri frámælinum eru:
1.
a) at tað er ikki nøktandi at seta fyribilshøli upp í skúlagarðinum
b) at Tórshavnar kommuna ikki leggur í tilboðið, tá ið hølisviðurskiftini, sum kommunan bjóðar skúlanum afturfyri at rúma tilboðnum, eru tvey brúkt fyribilshøli
2.
a) at tað minkar munandi um tað lítla økið, børnini hava at spæla á
b) at tað misprýðir skúlan, at hølini arkitektoniskt ikki hóska til skúlabygningin, og tað sendir eitt signal um, at hetta ikki verður gjørt heilhjartað
c) at vandi er fyri, at hølini verða standandi
d) at økið við skúlan kann ikki samanberast við grøna umhvørvið í Hoydølum, sum er stórur partur av læringsætlanini hjá serflokkinum
e) at skal sertilboðið vera á sama matrikli sum Eysturskúlin, so mælir skúlastýrið til, at skúlin verður útbygdur við einari lon aftrat, og at umstøðurnar í útiøkinum verða betri.

Skúlastýrið mælir til at skipa verður soleiðis fyri, at sertilboðið kann verða verandi í Hoydølum, til ein útbygging er farin fram í Eysturskúlanum, sum nøktar tørvin hjá sertilboðnum. Viðmerkingarnar frá skúlastýrinum verða tiknar við í viðgerðini av staðsetingarmøguleikum og í sambandi við byggimálsviðgerðina í verður í næstum.

**Fígging**
Feilur er í upphæddunum og kontunum í tilmælinum, sum varð samtykt á fundinum í mentamálanevndini 13. mai, og verður uppskotið til fígging, tí lagt fyri nevndina aftur.

Mælt verður til at fíggja verkætlanina av hesum kontum:
4113 Velbastaðar skúli 75 tkr.
4124 Frískúlin í Havn 315 tkr.
4126 Forskúli til Lítlaskúla 20 tkr.
4140 Ætlanir á skúlaøkinum 275 tkr.
4141 Undirvísingarportalur 10 tkr.
4142 Aðrar útreiðslur skúlar 29 tkr.
4144 Skúlabarnaflutningur 30 tkr.
Tilsamans 754 tkr.

Ætlanin er at megna at fíggja ætlanina innanfyri henda fíggjarkarm, hóast talan er um lægri upphædd, enn kostnaðarmetingin er.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja, at sertilboðið í Eysturskúlanum verður fíggjað av hesum kontum:

a) 275 tkr. av 4140 Ætlanir á skúlaøkinum
b) 75 tkr. av 4113 Velbastaðar skúli
c) 315 tkr. av 4124 FFrískúlin í Havn
d) 20 tkr. av Forskúli til Lítlaskúla
e) 10 tkr. av 4141 Undirvísingarportalur
f) 29  tkr. av 4142 Aðrar útreiðslur skúlar
g) 30 tkr. av 4144 Skúlabarnaflutningur
h) Mælt verður eisini til at játtaðu upphæddirnar verða fluttar á 4140 Ætlanir á skúlaøkinum

**Mentamálanevndin 10. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2020:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Ískoyti**:
Í sambandi  við at ADHD felagið hevur sent opið bræv um at finna pláss til serflokkar, serliga í Skúlanum á Fløtum, hava umboð fyri mentamáladeildina havt fund við felagið, har greitt var frá, at málið  er partur av størri evni um alt sernámsfrøðiliga økið, og at umsitingin í Tórshavnar kommunu hevur havt fundir og verkstovur við avvarðandi myndugleikar –serliga um verandi tilboð.

Á skúlaøkinum eru hesi tilboð:
- Hoyvíkar skúli hevur eitt tilboð til børn í autismu-spektrinum. 15 næmingar eru í tilboðnum
- Í Eysturskúlanum er tilboð til børn við ymsum avbjóðingum. Tilboðið er til børn í 1-3. árgangi og er í lonunum í Hoydølum, men flytur inn í Eysturskúlan seinni í ár. 6 næmingar eru í tilboðnum.
- Lopfjølin er eitt tilboð til næmingar, ið av ymsum orsøkum ikki megna vanliga skúlagongd og aftra seg við ella ikki koma í skúla. Tilboðið er í Margarinfabrikkini, og skúlaparturin er undir Skúlanum á Fløtum 11 næmingar eru í tilboðnum.
- 4-10 tilboðið hjá Skúlanum á Fløtum var upprunaliga til næmingar við ADHD, men er nú til næmingar við ymsum avbjóðingum. Tilboðið er í gula skúla við Landavegin, men fer út á Argir, tá Skúlin á Fløtum flytur í nýggja bygningin. 33 næmingar eru í tilboðnum.

**Tilmæli:**
Kunnað verður um málið

**Mentamálanevndin 09. september 2020:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
**Viðv. flyting av fyribils hølunum til Eysturskúlan**
Ætlanin er sett í fyribils bíðistøðu.

**Greiningar**
Forkvinnan í trivnaðarnevndini Súna Mørk setur fram ynski um at fáa greinað fylgjandi viðurskifti:
- At fáa lýst hvørji tilboð eru á sernámsfrøðiliga økinum sum eitt samlað yvirlit íroknað førleikastovur, sertilboð og serflokkar.
- Hvat fakliga verður mett, tørvur er at fáa afturat, hvat manglar?
- Hvat verður mett, er neyðugt at uppraðfesta?
- Hvat ítøkiliga “skríggjar” eftir hjálp?

- Tørvur er kanska eisini at vit “foreinkla” skipanina” ella fáa eitt meira greiðari yvirlit hvørji tilboð eru, hvar tey eru, hvar skal eg venda mær osfr
- Hvussu arbeiða vit okkum víðari fram við at fáa fleiri serstovur?
- Skuldi man uppraðfest stuðulstímar inni í flokkunum, til tað vanligu undirvísingina?
- Tilboðið við serflokki til børn 1 til 3 flokk, hvussu ber til at fáa sett tað á stovn? Eysturskúlin/Hoydalar sum er ein royndarverkætlan í dag
- Hvussu nógvir pengar eru avsettir til serøkið?

Meting hjá umsitingini
Talan er um viðurskifti og greiningar, ið tað ber til at fáa greinað her í vár at leggja aftur fyri nevnd. Neyðugt verður við einum breiðum samskifti við skúlar og aðrar myndugleikar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til at taka støðu til um umsitingin skal fara undir hesar greiningar.

**Trivnaðarnevndin 11. mars 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum at umsitingin fer undir hesar greiningar, at leggja aftur fyri nevndina.

**Ískoyti:**
Hóast mentamálanevndin hevur samtykt at seta á stovn sertilboð í Eysturskúlanum, so hevur tilboðið ikki fingið endaliga góðkenning frá Uttanríkis- og mentamálaráðnum.

Umsitingin hevur verið á fundi við Uttanríkis- og mentamálaráðið um serøkið í Tórshavnar kommunu. Á fundinum varð kunnað um, at Undirvísingarstýrið og Sernám hava sent Uttanríkis- og mentamálaráðnum tilmæli at skipa sertilboð í Eysturskúlanum. Mælt verður til, at sertilboð ætlað næmingum í 1.-3. fl. verður skipað eftir kunngerð nr. 24 frá 2019 “Kunngerð um at skipa serligan skúla ella undirvísingartilboð.” Tilboðið í Eysturskúlanum er enn ein royndarskipan, og tí eru starvsfólkini ikki sett eftir skipanini við sjálvstýrandi toymum.

Tilmælið frá Undirvísingarstýrinum og Sernámi er treytað av, at Tórshavnar kommuna kann veita neyðug høli til endamálið. Skal skipanin halda fram og útbyggjast, er neyðugt við støðugum kørmum, sum eru tættari skúlanum

Samtykt er at flyta fyribilshølini í garðinum hjá frk. Cohr, niðan í skúlagarðin í Eysturskúlanum, men hølini eru ikki flutt, og tí heldur tilboðið heldur enn til í lonunum í Hoydølum.

Ætlanin er, at serhølini verða brúkt til lærugreinina náttúru og tøkni, og umframt Eysturskúlan fer Smílibýlið at brúka hølini. Skal sertilboðið flyta inn í Eysturskúlan komandi skúlaár, er neyðugt at fara undir at flyta fyribilshølini nú, so tey kunnu vera tikin í nýtslu í august, og hølini inni í skúlanum kunnu vera klár til sertilboðið til grunddeildina.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja, at fyribilshølini í garðinum hjá Frk. Cohr verða flutt í Eysturskúlan so skjótt góðkenning er komin frá UMMR um at skipa sertilboð í Eysturskúlanum.

**Trivnaðarnevndin 06. mai 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Ruth Vang varð ikki við í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Við støði í spurningunum, sum forkvinnan í trivnaðarnevndini hevur sett um ymisk viðurskifti á sernámsfrøðiliga økinum, hevur umsitingin skrivað eitt upprit, sum verður lagt fram á fundinum. Víst verður til samtykt á fundi í trivnaðarnevndini tann 11. mars 2021.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til at umrøða uppritið.

**Trivnaðarnevndin 10. juni 2021:** Uppritið umrøtt.

**Ískoyti**
Hjálagt er dagført upprit um sernámsfrøðiliga økið.

Fyrra útgávan av uppritinum hevur verið til hoyringar hjá skúlaleiðslunum og er viðgjørt á fundi við umboð fyri Uttanríkis- og mentamálaráðið, Undirvísingarstýrið, Sernám, Eystursкúlan og Skúlan á Fløtum. Uppritið er dagført við støði í tí fundinum og í hoyringarsvari.

Við støði í uppritinum er ætlanin at raðfesta og fara í gongd við at gera kostnaðarmeting viðvíkjandi umbygging og tillaging av hølum til serflokkar og sernámsfrøðiliga økið sum heild.

Málið um dagføring av skúlabygnaðinum (mál 21/02652) verður lagt fyri trivnaðarnevndina á næsta fundi, og avgerðir í tí málinum hava ávirkan á, hvussu høliskapasiteturin í ymsu skúlunum verður gagnnýttur og sostatt eisini, hvørji høli møguliga eru tøk til sernámsfrøðiliga økið.

Skúlin á Argjahamri (mál 21/03568) hevur ætlanir um at søkja Uttanríkis- og mentamálaráðið um loyvi at seta á stovn serflokk í skúlanum. Hesin serflokkur er ætlaður næmingum í grund- og miðdeild. Á s. 6 í uppritinum stendur, at tørvur er á einum tilboði aftrat til næmingar við autismu ella líknandi avbjóðingum, og at hetta tilboð kundi verið í Skúlanum á Argjahamri, men neyðugt er at finna hølisloysn til tað.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja, at umsitingin saman við avvarðandi pørtum raðfestir og fær til vega kostnaðarmeting av nøkrum uppskotum í uppritinum at leggja fyri nevndina aftur.

**Trivnaðarnevndin 07. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Skúlin á Argjahamri hevur ætlanir um at søkja Uttanríkis- og mentamálaráðið um loyvi at seta á stovn serflokk í skúlanum (mál 21/03568). Í hesum sambandi samtykti trivnaðarnevndin 7. oktober í 2021, at umsitingin saman við skúlanum kannar, um tað ber til at finna aðrar góðar hølisloysnir til serflokk í Skúlanum á Argjahamri.

Umboð fyri byggningsdeildina og mentamáladeildina hava verið ástaðarfundi saman við skúlaleiðsluni og hugt at hølismøguleikum til serflokk í Skúlanum á Argjahamri.

Á fundinum vórðu hesir møguleikar umrøddir:

a) tannlæknahølini, men so má tannlæknin flyta. Ein møguleiki er at flyta tannlæknahølini í niðasta partin av Látrinum, innanfyri stólparnar har garaguhurðin er. Men tað gevur lítla meining at taka dýr høli niður í bygninginum, og síðani byggja tey aftur av nýggjum í sama bygningi.

b) innrættað part av Látrinum til serflokk. Skúlastjórin metir ikki, at tað er ein hóskandi loysn. Har er ov ófriðarligt. Atgongd verður ikki beinleiðis inn í skúlan, tað verður antin soleiðis, at tú fer út, og so inn gjøgnum høvuðsdyrnar inn í skúlan aftur ella gjøgnum Látrið, sum er innandura spæliøki.

c) í frítíðarskúlanum, tí partinum, sum er útbygdur, skúlin metir ikki, at tað er ein loysn, tí tað eru høli hjá frítíðarskúlanum.

d) byggja lon aftrat niðaneftir, har sum frítíðarskúlin er. Seta fyribilshøli upp, meðan bygt verður

e) seta fyribilshøli upp niðanfyri høllina, men spurningurin er, um tað er hóskandi økið til serflokk, tað er nakað árent. Hølini kundu verið til tveir flokkar í skúlanum, men so verður deildarbýtið brotið, og tað er ikki so heppið. Skúlin er bygdur soleiðis, at grund-, mið- og hádeild hava heimastovur, sum eru í hvør síni eind.

Tilmæli:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðanin mæla nevndini til at umrøða málið og taka støðu til, hvørjum møguleika arbeiðast skal víðari við at greina gjøllari.

**Trivnaðarnevndin 29. november 2021:** Samtykt at taka undir við at greina møguleika b.

**Ískoyti:**
Umsitingin er í holt við at kanna loysnir á ymisu skúlunum viðv. evt. neyðugum hølisloysnum til serøkið, og er hesaferð komin til eina ávegis niðurstøðu fyri Skúlan á Argjahamri. Uppskot til loysnir á øðrum skúlum kemur stigvíst gjøgnum árið.

Ein loysn er møgulig har innrættaði vera serstøk hølir til endamálið inni í hølinum, ið verður nevnt Látrið. Hóast tað vera tiknir fermetrar frá Látrinum, ið virkar sum eina innanhýsis skúlagarður og virknishøll, so vil funktiónin vera at kalla ótarnað. Sí hjáløgdu tekning. Skúlastjórin tekur undir við loysnini.

Umsitingin vil á fundinum greiða frá mettum kostnaði. Um ætlanin skal fremjast verður hon at raðfesta t.d. í sambandi við fíggjarætlanartilgongdina fyri 2023.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til at umrøða málið við atliti til at umsitingin kemur við neyvari tilmæli til komandi fund.

**Trivnaðarnevndin 10. februar 2022:** Ein meiriluti, Súna Mørk, Bjørg Dam og Kristianna Winther Poulsen, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Gunvør Balle og Jákup Dam, ynskja at fáa lýst avleiðingarnar av at taka burturav innandura spæliøkinum, Látrinum.

**Ískoyti**
Eftir ætlan skal 1-3 sertilboðið í Eysturskúlanum flyta omann í skúlan. Hølini í Eysturskúlanum vera væntandi liðug til summarferiuna.

Málið við tilboðnum er at geva børnunum eitt hóskandi tilboð so tíðliga sum møguligt við tí endamáli, at tey fara í vanligan flokk í seinasta lagi, tá tey skulu í 4. flokk. Um hetta í onkrum førum ikki ber til, eiga tey tá at verða visiterað til 4-10.

Størstu avbjóðingarnar, sum tilboðið arbeiðir við, eru kenslulig órógv og tilknýtisórógv, har tað at vera í einum stórum flokki, byggir upp eina strongd, sum næmingarnir hava torført at stýra.

Skúlaárið 2021/22 eru 10 børn í tilboðunum, og tvey av teimum verða visiterað úr tilboðnum hetta skúlaárið.

Nøkur børn eru visiterað inn í tilboðið úr øðrum skúlum. Hetta eru børn, sum hava gingið í vanligan flokk, men ikki megna tað og heldur ikki megna at vera í einum sertilboði, sum er staðsett inni í einum skúla. Talan er um børn, sum hava tørv á tilboði líknandi 4-10 tilboðnum.

Mikudagin 23. mars var fundur um sertilboð í Tórshavnar kommunu. Á fundinum vóru umboð fyri skúlar og frítíðarskúlar í kommununi, sum hava sertilboð, umboð fyri Uttanríkis- og mentamálaráðið, Sernám, Barna- og ungdómsdeildina og Mentamáladeildina. Tosað varð um 1-3 tilboðið, og at tørvur er á tilboði aftrat til tey børnini, sum ikki megna at fara í vanligan flokk.

Ein møguleiki er, at 1-3 tilboðið verður í tveimum eindum, og at onnur eindin fyribils verður í lonunum í Hoydølum. Børnini í hesi eindini eru tey, sum ikki megna at fara inn í vanligan flokk. Bæði Sernám og skúlin vísa á, at í Hoydalar er eitt sera gott umhvørvið til henda málbólkin, har børnini bæði trívast og mennast.

Lonirnar í Hoydølum eru ein fyribilsloysn, so neyðugt verður at finna eina varandi hølisloysn til tann bólkin í 1-3, ið neyvan fer at megna ein vanligan flokk, og tí verða visiterað inn í 4-10, tá tey fara úr 1-3.

Dagstovnavirksemið, sum er í lonunum, skal útbyggjast, so øll niðara hæddin verður dagstovnur burturav, og tí verður bert ovara hæddin tøk til sertilboðið, og tað er ikki vist, at tað er nøktandi til sertilboðið.

Hin eindin verður so inni í serstovuni í Eysturskúlanum. Hetta eru tey børnini, sum so líðandi kunnu fara inn í vanligan flokk, og har málið er, at tey í seinasta lagi, tá tey skulu í 4. flokk fara ella eru farin í vanligan flokk burturav.

Í eindini í Eysturskúlanum er pláss fyri 15 børnum, meðan í eindini í Hoydølum í ovaru hæddini í syðra enda á bygninginum kunnu í mesta lagi vera 6 børn.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og leiðarin á Barna- og ungdómsdeilini mæla trivnaðarnevndini til at samtykkja, at partur av 1-3 sertilboðnum heldur fram í lonunum í Hoydølum.

**Trivnaðarnevndin 07. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælin

**Ískoyti**
Í skrivi, dagf. 27. mai 2021, góðkendi landsstýrismaðurin sertilboðið í Eysturskúlanum. Ein treyt fyri góðkenningini er, at Tórshavnar Kommuna kann veita neyðugu hølini til sertilboðið *inni* í Eysturskúlanum.

Fyribilshølini eru sett upp í skúlagarðinum í Eysturskúlanum, fyirbilshølini verða brúkt til náttúru og tøkni, og so er eitt høli aftrat. Eysturskúlin og Frítíðarskúlin Smílibýlið fara at brúka hølini. Hølini til náttúru og tøkni inni skúlanum, kunnu nú innrættast til sertilboðið.
Upprunaliga varð mett, at bert ein skilaveggur skuldi setast upp í hølinum til náttúru og tøkni, soleiðis at tvey høli blivu til sertilboðið, men tað er als ikki nøktandi. Tørvur er á tveimum lítlum stovum, einum bólkarúmi og felagsøki við lítlum tekøki. (Tekning er hjáløgd).

Kostnaðarmetingin fyri innrætting av hølinum (náttúru og tøkni hølinum) í A-lonini til sertilboðið er 641.400,-kr. (Kostnaðarmetingin er hjáløgd). Játtan er ikki sett av til endamálið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin mælir til at fáa gjørt hølini til sertilboðið, men vísir á, at játtan er ikki tøk til endamálið.

**Trivnaðarnevndin 12. mai 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og heita á fíggjarnevndina um at ávísa fígging og beina málið í býráðið.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2022:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini og játta kr. 641.000,00 av konto 20910 og beina málið í býráðið sum eykajáttan, ið krevur tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 25. mai 2022:** Einmælt samtykt við fyrru viðgerð.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

## 118/22 Umsókn um fígging til forskúlalíknandi tilboð í Kaldbaks skúla skúlaárið 2022-23

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 29.11.2021 | 95/21 | 21/04845-2 |
| 2 Mentamálanevndin | 01.12.2021 | 288/21 | 21/04845-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 08.12.2021 | 324/21 | 21/04845-2 |
| 4 Býráðsfundur | 16.12.2021 | 316/21 | 21/04845-2 |
| 5 Trivnaðarnevndin | 12.05.2022 | 38/22 | 21/04845-2 |
| 6 Fíggjarnevndin | 18.05.2022 | 128/22 | 21/04845-2 |
| 7 Býráðsfundur | 25.05.2022 | 118/22 | 21/04845-2 |
| 8 Býráðsfundur | | | 21/04845-2 |

**Upprunin til málið**
Fyrstilærarin í Kaldbaks skúla og dagstovnaleiðarin á Flatnagarði hava sent Tórshavnar kommunu umsókn um fígging til forskúlalíknandi tilboð í Kaldbak. Umsóknin er send í telduposti 18. november 2021.

**Lýsing av málinum**
Skúlaárið 2022/23 ynskja skúli og dagstovnur at skipa eitt forskúlalíknandi tilboð við støði í royndunum hjá Nólsoyar skúla og Látrinum við líknandi tilboði.

Í umsóknini sendur m.a.:"Sum er, hevur verið vanligt, at elsti bólkur í barnagarðinum vitjar í skúlanum nakrar ferðir. Vanligt hevur tá verið, at hesi børn vitja inn í ein tíma hjá 1.,2.- og 3. flokki. Hetta er stak hugnaligt og virðismikið, men fer av undirvísingartíðini hjá næmingunum í hesum flokkum."

Søkt verður um 12,5 tímar um vikuna til skúlan. Nólsoyar skúli hevur játtan til 10 tímar. Lønarútreiðslurnar í 5 mánaðir frá august og árið út eru uml. 105 tkr fyri 12,5 tímar um vikuna og uml. 84 tkr fyri 10 tímar um vikuna.

Skúli og dagstovnur meta, at tílíkt tilboð er til gagns bæði fyri skúla, dagstovn, børn, námsfrøðingar og lærarar.
Í stuttum er ætlanin í høvuðsheitum at hava eina forvitnisliga og spælandi tilgongd til tøl og mongdir eins og bókstavir og ljóð – umframt hetta er ætlanin, at tilboðið fylgir ársætlan skúlans, og har tað er natúrligt eisini er partur av til dømis evnisvikum og útferðum, sum skúlin skipar fyri.

Støða er ikki enn tikin til um forskúlalíknandi tilboðið skal byrja um morgunin. Um so er, verður skúlin opin frá 7:30, og børnini fara aftur í barnagarð, tá tey eru liðug í skúlanum, ella um næmingarnir skulu byrja seinni um dagin og so enda við at vera í frítíðarskúla saman við 1.-3. flokki. Um børnini møta í skúlanum um morgunin, so er neyðugt, at skúlin er opin kl. 7:30, og starvsfólk má vera á staðnum tá, tað verður so ein hálvur tími eyka hvønn dag, tí er søkt um 12,5 tímar. Um børnini møta seinni um dagin, soleiðis at tey fylgjast við børnunum í 1. og 2. fl., tá tey fara í frítíðarskúla, so er ikki neyðugt við einum hálvum tíma eyka um dagin, og í tí føri verður talan um 10 tímar.

Sambært § 6 í kunngerðini um skipan og læring í forskúla, kunngerð nr. 108 frá 8. august 2013, kann forskúlaflokkur verða stovnaður, tá 12 børn eru í flokkinum, tó kann undantak gerast í smærru skúlunum.

Sambært fólkaskúlalógini § 4 stk. 4 kann verða loyvt at seta 1 árs forskúlaflokk/ar á stovn eftir gjøllari reglum, sum landsstýrismaðurin setur. Í § 30 stk. 3 stendur, at undirvísingin í ávikavist forskúlaflokki, 1. og 2. skúlaári ella 1., 2. og 3. skúlaári kann lutvís verða samskipað. Á hesum somu floksstigum kann øll undirvísingin í teimum smáu skúlunum verða samskipað.

Útreiðslurnar til forskúlalíknandi tilboðið í Nólsoy eru læraraløn og rakstrarjáttan pr. næm. Foreldrini rinda foreldragjald, men tað er til dagstovnin, og skúlin hevur ikki inntøkur av foreldragjaldi.

Um forskúlalíknandi tilboð verður í Kaldbaks skúla frá august 2022, verða útreiðslurnar í 2022 uml. 105 tkr til løn umframt uml. 4 tkr fyri hvørt barn. Játtan er ikki sett av í fíggjarætlanini fyri 2022 til endamálið. Endaligt uppskot til fígging verður lagt fyri nevnd í vár.

Tað eru 6 børn í Kaldbak, sum hava aldur at fara í forskúla skúlaárið 2022/23. Núverandi árgangir í skúlanum í Kaldbak eru millum og 5 næmingar.

Samstarvsavtalan millum Látrið og Nólsoyar skúla er hjáløgd, og um forskúlalíknandi tilboð verður stovnað í Kaldbak verður støði tikið í royndunum við forskúlalíknandi tilboði i Nólsoy, og tilboðið skipað eftir sama leisti.

Í umsóknini stendur, at skúlastýrið og foreldraráðið taka undir við skrivinum um forskúlalíknandi tilboð í kaldbaks skúla.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 52 frá 7. mai 2019

Kunngerð nr. 108 frá 8. august 2013 um skipan og læring í forskúla

**Upplýsingar frá umsitingini**
Einki at viðmekja

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Einki at viðmerkja

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ongar

**Skjøl**
Samstarvsavtala um forskúlalíknandi tilboð í Nólsoy er hjáløgd

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og leiðarin á Barna- og ungdómsdeildini mæla trivnaðarnevndini til:
a) at játta umsóknini og søkja Uttanríkis- og mentamálaráðið um loyvi at seta á stovn forskúlalíknandi tilboð í Kaldbaks skúla frá skúlaárinum 2022/23
b) at málið verður lagt fyri aftur í vár við tilmæli um fígging.

**Trivnaðarnevndin 29. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælunum og beina málið í mentamálanevndina.

**Mentamálanevndin 01. desember 2021:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini 29. november 2021.

**Fíggjarnevndin 08. desember 2021:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini og mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 16. desember 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Fyrstilærarin í Kaldbaks skúla hevur vent sær til forkvinnuna í trivnaðarnevndini við uppskoti um at skipa forskúla heldur enn forskúlalíknandi tilboð í Kaldbaks skúla. Sambært § 6 í kunngerðini um skipan og læring í forskúla kann forskúlaflokkur verða skipaður, tá ið 12 børn eru í flokkinum, og eiga í mesta lagi at vera 24 børn við skúlaársbyrjan, tó kann undantak gerast í smærru skúlunum. Sostatt ber til at søkja landsstýrismannin um loyvi seta á stovn forskúla í Kaldbak, hóast næmingatalið er niðanfyri 12.

Skipanin í Runavíkar kommunu er tann, at har er forskúli til tey seks ára gomlu og ikki barnagarður. Børnini eru í forskúla 4 tímar um dagin og fara síðani í frítíðarskúla. Starvsfólkanormeringin í Runavíkar kommunu er ein lærari og ein námsfrøðingur til hvønn forskúlaflokk. Í Tórshavnar kommunu er normeringin eitt starvsfólk til 9 børn, starvsfólkini eru lærarar og námsfrøðingar.

Fyrstilærarin vísir á, at heilt forskúlatilboð er bara ein vinningur fyri tey í Kaldbak, barnagarðinum tørvar pláss, og skúlin vil fegin hava tey seks ára gomlu børnini í skúlanum í forskúla. Haraftrat er lættari at fáa skikkað starvsfólk til fleiri tímar.

**Fígging forskúlalíknandi tilboð**
Víst verður til mál 20/00759 um samsýning fyri leiðslu í forskúlalíknandi tilboðum. Í útreiðslunum niðanfyri er roknað við lønarbrotið 0,067 til samsýning fyri leiðslu.

Útreiðslurnar til forskúlalíknandi við 12,5 tímum um vikuna við 6 næmingum teir 5 mánaðirnar frá august til desember í 2022 eru 131.000.- kr.

Útreiðslurnar til forskúlalíknandi við 12,5 tímum um vikuna og 6 næmingum í eitt ár eru 314.000,- kr.

**Fígging forskúli**
Um talan verður um forskúla, so kemur foreldragjald aftrat, og tað er í løtuni 9.290,- kr. um árið.

Útreiðslurnar til forskúlaflokk við 20 tímum um vikuna eftir sama leisti sum í Runavíkar kommunu við einum námsfrøðingi og einum lærara til hvønn flokk og við 6 næmingum teir 5 mánaðirnar frá august til desember í 2022 eru 323.000,- kr.

Útreiðslurnar til forskúlaflokk við 20 tímum um vikuna við einum námsfrøðingi og einum lærara til hvønn flokk eru 775.000,- kr.

**Forskúli ella forskúlalíknandi tilboð**
Tórshavnar kommuna hevur í skrivi til Uttanríkis og mentamálaráðið dagfest 9. des. 2021 søkt um loyvi at seta á stovn forskúlalíknandi tilboð í Kaldbaks skúla, og Mentamálaráðið hevur tann 21 desember 2021 góðkent, at forskúlalíknandi tilboð verður skipað í Kaldbaks skúla frá 1. august 2022.

Skal forskúli verða í Kaldbaks skúla er neyðugt at senda landsstýrismanninum í Uttanríkis og mentamálaráðnum umsókn um loyvi at skipa forskúla í Kaldbak.

Fyrimunur at hava forskúla heldur enn forskúlalíknandi tilboð, er, at børnini fáa ein meira samanhangandi dag og eitt tilboð, har báðir fakbólkarnir eru til staðar í flokkinum samstundis og betur fáa útfylt karmarnar í tilboðnum.

Vansi kann vera, at dagstovnurin missir ein árgang, og tey 6 ára gomlu børnini fara at mangla í tí tilboðnum.

Víst verður eisini til býráðssamtykt 24. februar 2022 um at skipa forskúla sum tilboð í øllum kommunalum skúlum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin mælir til at játta umsóknini um forskúla og søkja Uttanríkis- og Mentamálaráðið um loyvi at seta á stovn forskúla frá skúlaárinum 2022/23. Málið at beina í fíggjarnevnd og býráð.

Treytað av góðkenning frá Uttanríkis- og Mentamálaráðnum verður eisini mælt nevndini til útvega neyðuga játtan til rakstur av forskúlavirkseminum í Kaldbaks skúla. Fyri tíðarskeiðið august-desember 2022 er talan um kr. 323.000, sum tøk játtan ikki er til. Virksemið í 2023 verður at játta í fíggjarætlanini 2023.

**Trivnaðarnevndin 12. mai 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og heita á fíggjarnevndina um at ávísa fígging og beina málið í býráðið.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2022:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini og játta kr. 323.000,00 av konto 1110 Býráðið framflytnig frá 2021 og beina málið í býráðið sum eykajáttan, ið krevur tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 25. mai 2022:** Einmælt samtykt við fyrru viðgerð.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

# 119/22 Marknaumskipan á Bakkahellu 2, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.04.2022 | 90/22 | 22/01146-3 |
| 2 Tekniska nevnd | 04.04.2022 | 27/22 | 22/01146-3 |
| 3 Fíggjarnevndin | 20.04.2022 | 104/22 | 22/01146-3 |
| 4 Býráðsfundur | 25.05.2022 | 119/22 | 22/01146-3 |

**Upprunin til málið**
Umsókn frá eigara á Bakkahellu 2, Tórshavn, um at marknaumskipa matr.nr. 170, matr.nr. 171, matr.nr. 172 og litra q.

**Lýsing av málinum**
Húsini á Bakkahellu 2, eisini kend sum Strúkijarnið, liggja í 5 matriklum, har ymiskir eigarar eru á. Eigarin á Strúkijarninum ynskir at umvæla húsini, tí húsini eru illa farin. Áðrenn umvælingin kann fara í gongd er viðmælt eigaranum at fáa matrikulviðurskiftini upp á pláss.

Teir fimm matriklarnir á Bakkahellu 2 eru:

- Matr.nr. 170 Eigari á Strúkijarninum
- Matr.nr. 171 Ikki møguligt at finna arvingar ella eigara
- Matr.nr. 172 Eigari á Strúkijarninum
- Matr.nr. 173 Eigari á Strúkijarninum
- Litra q Tórshavnar Kommuna

Víst verður til kort »*Ánarar av Bakkahellu 2*«, har eigarin av Strúkijarninum er markerað við reyðum (1), Tórshavnar Kommuna er markerað við bláum (TK) og eigari, ið ikki er funnin, er markerað við grønum(Ó).

Umhvørvisstovan hevur boðað eigaranum á Strúkijarninum frá, at kommunan skal koma við einum ummæli til makaskifti/marknaumskipanina og so verða ognar- og matrikulviðurskiftini avgreidd á Umhvørvisstovuni aftaná.

Víst verður til skjal »*J.nr. 22/01146-5 Boð frá Umhvørvisstovuni*«

Makaskifti/Marknaumskipanin, ið verður lagt fyri nevnd/ráð:

- Matr.nr. 172 letur áleið 3 fermetrar til matr.nr. 170
- Matr.nr. 171 letur áleið 4 fermetrar til matr.nr. 170
- Matr.nr. 171 letur áleið 4 fermetrar til litra l
- Litra l letur áleið 2 fermetrar til matr.nr. 170
- Litra q letur áleið 2 fermetrar til matr.nr. 170
- Litra q letur áleið 1 fermetur til litra p

Víst verður til kortskjal *»22/01146-6 Kort eftir marknaumskipan«.*

Matr.nr. 173, Tórshavn, er minsti matrikul í Føroyum. Eigarin á Strúkijarninum og Umhvørvisstovan ynskja ikki at marknaumskipa matr.nr. 173, men lata hann liggja órørdan.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Heitt verður á Umhvørvisstovuna at endurnýta litra q, sum fellur burtur, við tí at leggja matr.nr. 17a um til litra q. Víst verður til skjal *»22/01146-7 matr.nr. 17a«*

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
22/01146-4 Ánarar av Bakkahellu 2
22/01146-5 Boð frá Umhvørvisstovuni
22/01146-6 Kort eftir marknaumskipan
22/01146-7 matr.nr. 17a

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/læettar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin á byggimálsdeildini, býarverkfrøðingurin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til at viðmæla marknaumskipanini/makaskiftinum og heita á Umhvørvisstovuna um at flyta litra q yvir á matr.nr. 17a, og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 04. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd.

**Býráðsfundur 25. mai 2022:** Einmælt samtykt.

# 120/22 Keyp av mannskapskúrum til bygningsrakstur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.04.2022 | 101/22 | 22/01384-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.04.2022 | 102/22 | 22/01384-1 |
| 3 Býráðsfundur | 28.04.2022 | 98/22 | 22/01384-1 |
| 4 Býráðsfundur | 25.05.2022 | 120/22 | 22/01384-1 |

**Upprunin til málið**
Plássmangul til nýggju eindina "bygningsrakstur"

**Lýsing av málinum**
Bygningsrakstur er ein nýggj eind undir bygningsdeildini. 1. apríl byrja tveir formenn afturat leiðaranum. Ætlanin er at seta ein afturat. Tørvur er tí á fýra nýggjum skrivstovu plássum, WC og fundar facilitetum til eindina.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Leiðarin fyri bygningsrakstur situr í dag inni á rakstrarstøðini á teknisku deild. Á rakstrarstøðini er ikki pláss fyri nýggju rakstrareindini. Leitað hevur verið eftir røttu loysnini í rakstrar umhvørvinum við Oyggjarvegin. Sí loftmynd í fylgiskjali.

Endamálið við at hava skrivstovurnar við Oyggjarvegin snýr seg eisini um at savna húsavørðarnar við Oyggjarvegin, og gera nýtslu av verkstøðunum á brandstøðini.

Húsavørðar hava í dag eitt verkstað í kjallaranum í badmintonhøllini í Gundadali. Staðið er ikki væl egnað. Samstundis ynskir frítíðarskúlin í badmintonhøllini at flyta eitt leigumál úr B 36 húsinum, sum húsar 3. flokki. Leiðslan vísir á avbjóðingar við at leiða virksemið í frástøðu, tí er ynski, at fáa kjallaran í badmintonhøllini til frítíðarskúla virksemið .

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Í samráðingum við MT-Højgaard um endauppgerð til verkætlanina URD, bjóðaði MT Højgaard TK tríggjar skúrar, sum felagið ikki brúkar meir. Kostnaðaráseting varð gjørd á kr. 400.000 fyri allar skúrarnar. Sí myndir & tekningar í fylgiskjali. Skúrarnir eru 3 ára gamlir og í góðum standi. Nýggir skúrar av hesum slagnum høvdu kostað umleið 750.000, um teir skulu keypast nýggir.

Samráðingarnar um URD, endaðu við semjuskjali, sum merkir at umleið 300.000 kr. verða eftir á íløgu kontoini, tá allar rokningar fyri verkætlanina eru goldnar

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Leiðarin á Brandstøðini hevur mett um og peikað á staðið, har ætlanin er at seta skúrarnar. Í dag standa gamlir skúrar á staðnum, sum áður hava verið nýttir til brandvenjingar.

**Skjøl**
"Myndir & tekningar" journalnummar 22/01384-2

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>25. mai 2022 | Blað nr.: 513<br><br>Formansins merki: |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/læ ttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á bygningsdeildini mæla til at heimila umsitingini at keypa skúrarnar og at arbeiða víðari við at skipa arbeiðsplássini á vísta staðnum.

Rakstrar kontan "6110" ber kostnaðin, sum tilsamans verður mettur til umleið 500.000 kr. Biðið verður samstundis um heimild til at inntøkuføra 300.000 kr. av Íløgukontoini fyri verkætlanina "URD" til rakstrar kontoina 6110.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Fíggjarnevndin 20. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. apríl 2022:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri, ongari ímóti og einari blankari við fyrstu viðgerð og málið beint víðari til aðru viðgerð.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Helena dam á Neystabø, Bjørg Dam, Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle, Rói B. Poulsen og Ruth Vang.

Blankt atkvøddi: Jan Christiansen

**Býráðsfundur 25. mai 2022:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

## 121/22 Bráðfeingis ábøtur á vegakervið 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 04.04.2022 | 35/22 | 22/01410-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.04.2022 | 99/22 | 22/01410-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 27.04.2022 | 119/22 | 22/01410-1 |
| 4 Býráðsfundur | 28.04.2022 | 100/22 | 22/01410-1 |
| 5 Býráðsfundur | 25.05.2022 | 121/22 | 22/01410-1 |

**Upprunin til málið**
Vetrarnir 2020/2021 og 2021/2022 hava verið sera merktir av kava og frosti. Kavarudding og salting hava í hesum tíðarskeiði verið viðvirkandi til, at standurin av fleiri vegastrekkjum í Tórshavn er versnaður so mikið, at akuttar ábøtur eru neyðugar. Samskifti hevur verið millum umsitingina og formannin í teknisku nevnd um at fáa henda bráðfeingis tørv á ábótum framdan, áðrenn vegakervið ferst enn verri.

**Lýsing av málinum**
Rakstrarstovnurin undir teknisku deild hevur lagt fram asfalteringsætlan, sum er grundað á viðlíkahaldstørvin, áðrenn hesin eyka tørvurin er staðfestur eftir at kavin 2021/2022 er farin. Metingar hjá Rakstarstovninum eru, at slitið, sum nú er staðfest, ikki kann bøtast innan verandi fíggjarkarmar á kt. 8112 Asfalt fyri 2022.

Tørvur er á, at bráðfeingis tiltøk verða setta í verk beinanvegin, sum kortini ikki ávirka verandi asfaltsætlan. Átøkini eru serliga hesi:

- Strípufresingar og –asfalteringar
    - Bøtur, sum eru meira haldbarar enn vanlig uppfylling av holum
- Yvirflatuviðgerðir
    - Endurnýgging av bitumen, sum leingir haldbæri av asfaltinum, tó ikki eins leingi og asfaltering.
- Framskundað fresing og asfaltering.
    - Vegateinar, sum ikki tola at bíða eftir asfaltsætlan, mugu raðfestast fremst.

Vandi er fyri, at um nevndu átøk ikki verða framd í 2022, at mest slitnu vegirnir fara at slítast við enn størri ferð. Hetta við tí úrsliti, at skaðar kunnu henda á fólk og akfør.
Mett verður, at Rakstrarstovnurin kann framleiða ábøtur eftir omanfyri nevnda leisti fyri kr. 3.000.000 í 2022 á teimum vegateinum, sum hava størstan tørv.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>25. mai 2022 | Blað nr.: 515<br>Formansins merki: |

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at játtaðar verða kr. 3.000.000 av konto XXX á konto 8112.

**Tekniska nevnd 04. apríl 2022:** Samtykt at heita á fíggjarnevndina at útvega fígging til hesa bráðfangis neyðugu íløgu.

**Fíggjarnevndin 20. apríl 2022:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 27. apríl 2022:** Samtykt at játta 3 mió. kr. av konto 6175 umsiting og røkt av fastari ogn (Keyp/søla) á konto 8112 asfalt og at beina málið í býráðið sum eykajáttan.

**Býráðsfundur 28. apríl 2022:** Einmælt samtykt**.**

**Býráðsfundur 25. mai 2022:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

## 122/22 Vetrarfriðing í Tórshavnar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Kollafjarðarnevndin | 10.11.2014 | 27/14 | 14/00949-2 |
| 2 Økisnevndin | 03.11.2014 | 26/14 | 14/00949-2 |
| 3 Økisnevndin | 02.11.2015 | 21/15 | 14/00949-2 |
| 4 Kollafjarðarnevndin | 23.11.2015 | 17/15 | 14/00949-2 |
| 5 Økisnevndin | 11.01.2016 | 2/16 | 14/00949-2 |
| 6 Økisnevndin | 07.03.2016 | 3/16 | 14/00949-2 |
| 7 Fíggjarnevndin | 09.03.2016 | 102/16 | 14/00949-2 |
| 8 Fíggjarnevndin | 13.04.2016 | 145/16 | 14/00949-2 |
| 9 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 173/16 | 14/00949-2 |
| 10 Kaldbaksnevndin | 27.04.2016 | 6/16 | 14/00949-2 |
| 11 Økisnevndin | 02.05.2016 | 9/16 | 14/00949-2 |
| 12 Kollafjarðarnevndin | 09.05.2016 | 10/16 | 14/00949-2 |
| 13 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 197/16 | 14/00949-2 |
| 14 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin | 31.05.2016 | 6/16 | 14/00949-2 |
| 15 Økisnevndin | 29.08.2016 | 14/16 | 14/00949-2 |
| 16 Nólsoyarnevndin | 30.08.2016 | 7/16 | 14/00949-2 |
| 17 Hvítanesnevndin | 05.09.2016 | 3/16 | 14/00949-2 |
| 18 Hest/Koltursnevndin | 08.09.2016 | 8/16 | 14/00949-2 |
| 19 Økisnevndin | 16.01.2017 | 2/17 | 14/00949-2 |
| 20 Økisnevndin | 13.02.2017 | 8/17 | 14/00949-2 |
| 21 Fíggjarnevndin | 22.02.2017 | 43/17 | 14/00949-2 |
| 22 Økisnevndin | 03.04.2017 | 9/17 | 14/00949-2 |
| 23 Økisnevndin | 15.05.2017 | 11/17 | 14/00949-2 |
| 24 Økisnevndin | 11.09.2017 | 17/17 | 14/00949-2 |
| 25 Fíggjarnevndin | 20.09.2017 | 203/17 | 14/00949-2 |
| 26 Kollafjarðarnevndin | 16.10.2017 | 4/17 | 14/00949-2 |
| 27 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 213/17 | 14/00949-2 |
| 28 Økisnevndin | 06.11.2017 | 19/17 | 14/00949-2 |
| 29 Økisnevndin | 09.04.2018 | 5/18 | 14/00949-2 |
| 30 Økisnevndin | 04.11.2019 | 11/19 | 14/00949-2 |
| 31 Økisnevndin | 09.03.2020 | 4/20 | 14/00949-2 |
| 32 Fíggjarnevndin | 20.05.2020 | 125/20 | 14/00949-2 |
| 33 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 100/20 | 14/00949-2 |
| 34 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.05.2022 | 123/22 | 14/00949-2 |
| 35 Fíggjarnevndin | 18.05.2022 | 130/22 | 14/00949-2 |
| 36 Býráðsfundur | 25.05.2022 | 122/22 | 14/00949-2 |

### Málslýsing:

Bygdahegn Kollafjørður (vetrarfriðing)

Tórshavnar kommuna er farin í gongd við arbeiðið, at fáa sett upp bygdahegn í øllum bygdunum í kommununi. Talan er um, at fáa seyðin út úr bygdunum so at tilber, at fríðka um bygdina og skapa betri trivna millum fólk. Arbeitt verður við hesi ætlan í Nólsoy og nú er planurin at byrja upp á Kollafjørð.

**Tilmæli:**
Fyristingarstjórin og økissamskiparin mæla til, at økisnevndin tekur undir við at hetta arbeiðið byrjar nú og at nevndin saman við umsitingini tekur stig til at tosa við teir eigarar og Landsverk, sum varða av økinum rundan um Kollafjørð.

**Økisnevndin 03. november 2014:**

**Ein meiriluti:** Halla Samuelsen, Jákup Dam, Sigrún Mohr og Bjørghild Djurhuus tekur undir við tilmælinum.

**Ein minniluti:** Annfinn Brekkstein tekur undir við tilmælinum, tó við tí fyrivarni at tað ikki skal hava nakrar fíggjarligar avleiðingar fyri Tórshavnar kommunu.

**Kollafjarðarnevndin 10. november 2014:** Økissamskiparin kunnaði um at arbeiðið um vetrarfriðing í Kollafirði fer í gongd nú.

**Økisnevndin 02. november 2015:** Kunnað varð um málið.

**Kollafjarðarnevndin 23. november 2015:** Kunnað varð um málið.

**Økisnevndin 11. januar 2016:** Útsett.

**Ískoyti:**
Í sambandi við tilgongdina, at vetrarfriða Kollafjørð er nú gjørd ein útrokning, sum vísir eitt estimat fyri hvat kommunan skal gjalda til hegning og avloysing av vetrarbiti fyri hagarnar á Signabø og Oyrareingir. Í samráð við bøndirnar er løgd ein linja fyri hvussu hegningin skal skipast. Síðani er roknað út hvussu nógv lendi bøndirnir missa í sambandi við vetrarbit.

| **Hegn.** | **metrar** | **Kr./m** | **íalt** |
|---|---|---|---|
| Signabøur | 1.780 | 150 | 267.000 |
| Oyrareingir | 3.740 | 150 | 561.000 |
| | | | |
| **Mist vetrarbit:** | **M²** | **kr/m²** | |
| **Signabøur** | | | |
| Velt | 57.697 | 4,80 | 276.946 |
| ikki velt | 25.149 | 0,70 | 17.604 |
| **Oyrareingir** | | | |
| Velt | 0 | 4,80 | 0 |
| ikki velt | 0 | 0,70 | 0 |
| Rulluportur | 1 | 70.000 | 70.000 |
| Annað | | | 50.000 |
| | | | 1.242.550 |

Í uppgerðini er brúkt 150,- fyri hegning pr. metur. Tvs. 35,- kr. fyri tilfarið og 115,- fyri hegningina pr. metur. Í hesi útrokning er ikki tikin støða til hvat viðlíkahald av hegninum í framtíðini kemur at kosta kommununi.

**Økisnevndin 07. mars 2016:** Samtykt at beina málið í figgjarnevdina til ummælis.

**Fíggjarnevndin 09. marts 2016:** Samtykt at fáa til vega eina heildarætlan, ið lýsir kostnað og leist, fyri vetrarfriðing av øllum bygdum í kommununi.

**Ískoyti:**
Umsitingin kemur at greiða frá.

**Fíggjarnevndin 13. april 2016:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Í sambandi við, at umsitingin skal fáa til vega eina heildarætlan, ið lýsir kostna og leist, fyri vetrarfriðing av øllum bygdum í kommununi er ynskiligt, at fáa eina ábending frá kaldbaksnevndini um tørvin á vetrarfriðing í Kaldbak.

**Kaldbaksnevndin 27. april 2016:** Staðbundna nevndin hevur umrøtt uppskot frá umsitingini um vetrarhegn í Kaldbak. Avtalað varð, at hava ein fund við festararnar í Kaldbak um hegnlinju.

**Ískoyti:**
Viðvíkjandi vetrarfriðing av Kollafirði, Oyrareingir og Signabø er fylgjandi samlað uppgerð gjørd yvir hvat hetta umleið kemur at kostað kommununi:

| | | |
|---|---|---|
| Longd hegn: | 16.800 m. | 1.512.000 |
| Rulluportur: | 2. stk. | 300.000 |
| Avloysing vetrarbit | 168.700 m2 | 809.760 |
| Árligt viðlíkahald | | 100.800 |
| Tilsamans | | 2.621.760 |

Prísurin fyri hegn er settur til 50,-/m. til hegn, pelar o.a. og prísurin fyri uppsetan er settur til 40 kr./m. Rulluportur eru sett til 150.000,- pr. stk. við ísetan. Avloysing fyri vetrarbit er sett til 0,70 kr./m2 fyri ódyrkað og 4,80 kr./m2 fyri dyrkað lendi. Árligt viðlíkahald er sett til 6 kr. pr. metur og tá er avskrivingin sett til 30 ár.
Metingin er gjørd við støði í fylgjandi fyritreytum hjá umsitingini:

- Hegnføringin er ikki gjørd í samráð við eigarar og bøndir á staðnum
- Støða er ikki tikin til um verðandi hegn kann nýtast, har tað stendur frammanundan
- Kostnaður fyri rulluportur er mettur til 150.000 kr. við ísetan, undantikið á landsvegi
- Avloysing av vetrarbit er mett, men um tað eru ivamál, kann Matrikulstovan gera neyvar mátingar. Búnaðarstovuni tekur endaliga avgerð um avloysing av vetrarbiti á almennari festijørð, saman við festaranum
- Ymisk jarðarstykkir, sum kommunan og onnur hava keypt mugu kannast nærri um avloysing fyri vetrarbit er goldin.
- Árliga viðlíkahaldið er sett til 6,-. kr/metur

Út frá hesum fortreytum kann sigast, at samlaði kostnaðurin upp á 2,6 mill fyri vetrarfriðing av Kollafirði, Oyrareingjum og Signabø kann blíva munandi lægri, um størri ella minni strekkir av hegni kunnu endurnýtast og um avloysingin av vetrarbitið ikki blívur so umfatandi sum mett er.

**Økisnevndin 02. maj 2016:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Umsitingin kemur at greiða frá heildarætlanini.

**Kollafjarðarnevndin 09. maj 2016:** Kunnað varð um málið.

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016:** Útsett.

**Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin 31. maj 2016:** Málið varð umrøtt.

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Samtykt at fara undir eina heildarætlan at vetrarfriða alla kommununa og at peningur til arbeiðið verður játtaður í sambandi við fíggjarætlanina 2017.

**Økisnevndin 29. august 2016:** Kunnað varð um málið.

**Nólsoyarnevndin 30. august 2016:** Kunnað varð um málið.

**Hvítanesnevndin 05. september 2016:** Kunnað varð um málið.

**Hest/Koltursnevndin 08. september 2016:** Kunnað varð um málið. Ynski frá staðbundnu nevndini í Hesti at arbeiða við vetrarfriðing í Hesti.

**Økisnevndin 16. januar 2017:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti**:
Á síðu 5, fjórsíðsta reglubrotið í samgonguskjalinum frá 30. decembur 2016, stendur «vetrarfriðing verður framd, har ynski er um tað». Um hesin málsetningur skal náast er átroðkandi, at peningur verður settur av til verkætlanina. Hetta kann gerast við einari passandi upphædd um árið - í nøkur ár. Ein leyslig meting vísir, at talan er um 6 og 9 mio. fyri alla verkætlanina - alt eftir hvussu nógvar bygdir ynskja vetrarfriðing.

Fyri at fáa gongd á arbeiðið, har Kollafjørður er peikaður út sum mest átroðkandi, bæði fyri trivna og trygd, er tað sera umráðandi, at peningur verður settur av til verkætlanina soleiðis, at umsitingin kann fara undir arbeiðið at tosað víð teir bøndir og privat fólk, sum eiga lendið í Kollafirði, ið verða rakt av einari vetrarfriðing.

Um peningur verður játtaður og áhugi er í politiska valdinum til hesa verkætlan, so er eingin forðing fyri at fara undir, at fáa tær formellu avtalirnar upp á pláss og síðani at nýta ein part av summarinum og heystinum til at seta skjøtul á sjálva hegningina.

**Tilmæli:**
Økissamskiparin mælir til, at økisnevndin tekur støðu til hesa verkætlan og síðani, um meirluti er fyri tí, sendir málið víðari til fíggjarnevndina til støðutakan.

**Økisnevndin 13. februar 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. februar 2017:** Samtykt at fara undir eina tilgongd at vertrarfriða økini í kommununi og at peningur verður settur av í eini langtíðaríløguætlan.

**Ískoyti:**
Alt bendir nú á, at peningur verður settur av til vetrarfriðing av bygdunum í Tórshavnar kommunu. Alt eftir hvussu stór upphæddin verður, so er tað neyðugt, at økisnevndin tekur støðu til hvønn leist, umsitingin skal leggja fyri dagin, í hesum máli.

Talan hevur verið um, at umsitingin bjóðar umboðum fyri hagapartin Heimara Helvt í Nólsoy til fundar, fyri at fáa gjørda eina endaliga avtalu um vetrarfriðing av bygdini. Í Nólsoy. Næstan øll hegningin er liðug og manglar tí bert ísetan av tveimum rulluportrum.

Eisini er Kollafjørður nevnd, sum ein bygd har vetrarfriðing er alneyðug – bæði tá ið hugsað verður um trygd á vegunum og trivnaðinum í bygdini.

**Tilmæli:**
Økissamskiparin mælir til, at økisnevndin tekur støðu til ein raðfesting av bygdunum.

**Økisnevndin 03. apríl 2017:** Nevndin samtykti at gera eina raðfesting soleiðis at byrjað verður í Nólsoy og annars lýsa nærri hvussu viðlíkahald er skipað í øðrum kommunum.

**Ískoyti:**
Økissamskiparin kunnar um gongdina í málinum.

**Økisnevndin 15. mai 2017:** Kunnað varð um um málið og økissamskiparin arbeiðir víðari við málinum.

**Ískoyti:**

**Bygdahegn í Kollafirði**
Í sambandi við at Tórshavnar kommuna hevur sett 1 mió. kr. av til vetrarfriðing av bygdunum í 2017. Umsitingin hevur á fundi við avvarðandi festarar og eigarar hava avtalað eina mannagongd og ætlan fyri uppsetan av bygdahegninum. Samráðst verður við avvarðandi bóndir og privatar eigarar um avtalur, um víddir, avloysing og gjøld fyri miss. Hetta er treytað av, at peningur verður játtaður til framhald.
Ætlanin er nú, at seta skjøtul á arbeiðið við at stiga frá norðara enda í bygdini og heim til skúlan. Talan er um uml. 3.500 m., og við einum eindarprísi upp á 100 kr. pr. m., sum tilboð er givið uppá, so er talan um 350 túsund krónur.

Tá ið peningurin er játtaður, verður biðið um tilboð frá trimum veitarum upp á arbeiðið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at játta kr. 350.000 av konto 6210.

**Økisnevndin 11. september 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. september 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og játta kr. 350.000 av konto 6210 og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Einmælt samtykt.

**Kollafjarðarnevndin 16. oktober 2017:** Økissamskiparin kunnaði um at arbeiðið er byrjað.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur havt fund við umboð frá Heimara Haga í Nólsoy fyri, at kunna tey um gongdina í málinum viðvíkjandi vetrarfriðing í Tórshavnar kommunu. Eisini arbeiðir umsitingin við einum uppskoti til avatalu við Heimara Haga í Nólsoy um vetrarfriðing.

Økissamskiparin kunnar nevndina um uppskot til avtalu millum Heimara haga og kommununa.

**Økisnevndin 06. november 2017:** Samtykt at arbeitt verður víðari við málinum so vetrarfriðingin í Nólsoy kann avgreiðast.

**Økisnevndin 09. apríl 2018:** Kunnað varð um málið og arbeitt verður víðari við málinum.

**Ískoyti:**
Í sambandi við vetrarfriðing av bygdunum í Tórshavnar kommunu, so verður arbeitt við tveimum bygdum. Deils Nólsoy, har arbeiðið byrjaði heilt aftur í 2005 og so eisini Kollafjørður.
Støðan í Nólsoy er tann, at umsitingin hevur seinastu tvey árini verið í samráðingum við umboð fyri hagapartin Heimara Helvt og eru tær samráðingarnar nú komnar so langt, at bert nøkur formell viðurskifti skulu fáast upp á pláss, áðrenn sáttmálin kann leggjast fyri hagafundin og síðani eisini fíggjarnevndina í TK. Ætlanin er, at fáa tey formellu viðurskiftini upp á pláss í 2019 og síðani fáa útint tað arbeiðið ið manglar, í 2020.

Viðvíkjandi Kollafirði, so eru fleiri avtalur við bøndurnar komnar upp á pláss. Talan er um íalt seks ymsar avtalur, umframt Oyrareingir og Signabøur. Fimm av teimum seks avtalunum í Kollafirði eru um at verða komnar undir land, men enn manglar Todneshagin. Stórsti og mest umfatandi hagin er Sjóarhagi Niðaripartur og eru ávís viðurskifti har, sum ikki eru avgreidd enn. Nevnast kann, at eitt mál liggur í yvirbúnaðarstevnu og skal avgerð takast, um hvør skal halda hegnið fram við landsvegnum í Líðini. Í Kollafirði er ætlanin, at fáa allar avtalur upp á pláss og fáa hegnað liðugt í 2020.

**Økisnevndin 04. november 2019:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Avtalan um vetrarfriðing í Nólsoy við Heimara Haga er nú við at verða komin undir land, og vil umsitingin tí leggja eitt uppskot til avtalu millum Heimara Haga og Tórshavnar kommunu fyri økisnevndina til góðkenningar og síðani, at beina málið fyri fíggjarnevndina til endaliga góðkenningar.
Mettur kostnaður fyri at gera arbeiðið liðugt í Nólsoy, er uml. 265.000,- uttan mvg.

| | |
|---|---|
| Ísetan av rørportrum 70.000,- x 2 | 140.000,- |
| Uppsetan av hegn um. 500 m x 150 kr./m | 75.000,- |
| Portur o.a | 50.000,- |
| Íalt | 265.000,- |

Í avtaluni skal Tórshavnar kommuna gjalda haganum kr. 10.000,- um árið, fyri leigu av lendinum ið liggur innan fyri vetrarhegnið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og økissamskiparin mæla til, at økisnevndin góðkennir avtaluna og at avtalan verður løgd fyri fíggjarnevndina til endaliga góðkenningar. Kostnaðurin fyri liðugtgerðan av hegni og ísetan av rørportrum skal gjaldast av íløgukonto «vetrarfriðing» 6275 og árliga gjaldið á 10.000,- kr. skal gjaldast av rakstrarkonto 6210.

**Økisnevndin 09. mars 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2020:** Samtykt at taka undir við økisnevndini.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
sambandi við at peningur manglar á verkætlanini L62035 «Vetrarfriðing» verður mælt til, at flyta kr.145 túsund frá karminum LK62065 til vetrarfriðing L62035.

Í sama viðfangi verður eisini mælt til, at flyta 1. mió. av karminum LK62049 «vetrarfriðing Nólsoy og Kollafjørður» til verkætlanina L62035 «vetrarfriðing». Hesin peningur skal m.a. nýtast til ísetan av tveimum rørportrum í Nólsoy (sí ískoyti 04. nov. 2019) og til ymiskt arbeiði í sambandi við vetrarfriðing í Kollafirði.

Eisini skal ein partur av peninginum nýtast til at taka gamla almenna wc burtur í Nólsoy fyri síðani at fáa nýggja wc-skúrin, ið var keyptur í fjør, settan til. Sama er galdandi fyri Hest, har ein wc-skúrur er keyptur og skal festast og íbindast verandi rør og leiðingar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og økissamskiparin mæla til, at 145 túsund krónur verða fluttur av karminum LK62035 til verkætlanina vetrarfriðing nr. L62035. Síðani eisini, at 1 mió. krónur verða fluttar av karminum LK62049 til verkætlanina L62035 vetrarfriðing. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. mai 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. mai 2022:** Einmælt samtykt.

# 123/22 Ferðslutrygd við Eysturskúlan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 10.05.2021 | 28/21 | 20/04029-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 13.09.2021 | 51/21 | 20/04029-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 22.09.2021 | 222/21 | 20/04029-1 |
| 4 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 229/21 | 20/04029-1 |
| 5 Tekniska nevnd | 26.04.2022 | 38/22 | 20/04029-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 27.04.2022 | 121/22 | 20/04029-1 |
| 7 Býráðsfundur | 28.04.2022 | 96/22 | 20/04029-1 |
| 8 Býráðsfundur | 25.05.2022 | 123/22 | 20/04029-1 |

**Upprunin til málið**
Foreldur at næmingum á Eysturskúlanum eru ótrygg við ferðslutrygdina á staðnum.

**Lýsing av málinum**
Foreldur og foreldraráð á Eysturskúlanum hava heitt á kommununa um at finna eina haldgóða loysn, so ferðslutrygdin kann verða so góð sum til ber.

Umsitingin hevur gjørt eitt ávegis uppskot, 20/04029-2, til hvussu ferðsluviðurskiftini kunnu gerast betri.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | x | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at heimila umsitingini at arbeiða víðari við uppskotinum 20/04029-2.

**Tekniska nevnd 10. mai 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyt:**
Umsitingin hevur gjørt eitt endaligt uppskot, 20/04029-4, og gjørt eina kostnaðarmeting av at ferðslutryggja vegirnar við Eysturskúlan.
Uppskotið fevnir eisini um at fáa til vegar 29 p-pláss til Eysturvøll. Hetta tí íbúgvarar í grannalagnum kæra sína neyð um parkerings óskil við vøllin.

T.v.s. at arbeiðið er klárt at bjóða út sum undirhondsboð til tveir arbeiðstakarar.

Fíggjartørvurin er mettir til 1,8 mill. kr. og kann fíggjast av íløgukonto 8175.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at:
- Tikið verður undir við, at nevnda verkætlan kann byrja.
- At flyta kr. 1.800.000 kr. av konto 8175, LK81043 (Parkeringstunnil), á nýggja verkætlan «Ferðslutrygd við Eysturskúlan» undir konto 8175
  Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 13. september 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum. Tó skal vegateinurin fram við eysturvølli og parkeringsøkið vestan fyri eysturvøll ikki gerast og um peningur er eftir, skal restin brúkast til skúlagarðin við Eysturskúlan.

**Fíggjarnevndin 22. september 2021:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið hevur verið í útboði, og lægsta boð átti Maskingrevstur v/Allan og var 2.306.764 kr. v. 6.25% mvg.
Aftrat hesum kemur ferðslutrygdarátøk á 260.000 kr.
Óvæntað roknast til 10% svarandi til 250.000 kr.
Fíggjartørvurin er íalt 2.816.764 kr. v. 6.25% mvg.
Áður játtað 1.300.000 kr., írestandi tørvur er 1.517.000 kr.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at:
- Tikið verður undir við, at nevnda verkætlan kann byrja.
- At flyta kr. 900.000 av 8175, LK81999, Vegaverkætlanir, og 617.000 kr. av 6875, LK68999, Kloakkir
- Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 26. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 27. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. apríl 2022:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 25. mai 2022:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

## 124/22 Dagføring av Jøkulstræti

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.03.2019 | 17/19 | 19/00853-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 10.03.2020 | 19/20 | 19/00853-1 |
| 3 Tekniska nevnd | 02.05.2022 | 41/22 | 19/00853-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 18.05.2022 | 131/22 | 19/00853-1 |
| 5 Býráðsfundur | 25.05.2022 | 124/22 | 19/00853-1 |

**Upprunin til málið:**
Nú Landavegurin er dagførdur, so treingir síðugøtan Jøkulstræti til at dagførast. Eisini er stórur tørvur á p-plássum í økinum.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Umsitingin hevur gjørt eitt uppskot til dagføring av Jøkulstræti. Uppskotið umfatar strípað gongubreyt í niðara borð á 1,5 m, eina vegaføring á 2*2,75 m, p-pláss vinkulrætt á vegalinjuna framvið matr. nr. 910ap og 910æ, Tórshavn, og eina gongubreyt á 1,5 m í ovara borð. Síðst nevnda gongubreyt er ætlað til sjónveik, sum ferðast til og frá Føroya Blindastovn.

Ætlanin er eisini at taka hond um kloakkføringarnar í økinum, soleiðis at regnvatn verður tikið burtur úr skittvatnskloakkini. Sum nú er, fer regnvatn í skittvatnskloakkina. Eisini er økið sera vátt oman fyri Jøkulstræti. Her er ætlanin at leggja ein drenleiðing framvið í ovara borð.

Verkætlanin verður prosjekterað innanhýsis, og tilfarsveitingar verður byggiharraveiting fyri at gera verkætlanina bíligari.

Ætlanin er at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ferðslulógin.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Staðseting av stórari mastur hjá FT-Net.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ætlanin er at leggja uppskotið til loysn fyri ferðslunevndina.
Byggi- og umhvørvisdeildin og býarskipanardeildin verða kunnaðar um verkætlanina.

**Skjøl**

| | |
|---|---|
| Plantekningar | Plantekning nr. 1 |
| | Plantekning nr. 1A |
| Fíggjarskjøl | Kostnaðarmeting_HVÚ |
| | Kostnaðarætlan C |

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

Um roknað verður við einum meturkostnaði á 5.500,- kr./m, so verður kostnaðurin fyri handverkaraútreiðslur umleið kr. 570.000,- u/mvg fyri umleið 103 m av vegi.
Samlaði kostnaðurin íroknað projektering og eftirlit og 6,25% mvg verður uml. kr. 1,0 mió.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at dagføra Jøkulstræti og samstundis at gera minst 27 nýggj parkeringspláss á økinum, at innheinta 2 undirhondsboð uppá arbeiðið og at játta kr. 1,0 mió. til arbeiðið av íløgukarminum fyri vegir og parkering, konto.nr. 8175, løgunummar L00001.

**Tekniska nevnd 12. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Ráðgevi hevur m.a. í samráð við grannalagið, vegna kommununa tillagað prosjekt at dagføra Jøkulstræti og sett arbeiðið at gera vegin í útboð.

Tilboð verða tøk 5. mars 2020, at leggja fyri nevnd á fyrstkomandi nevndarfundi.

**Tilmæli:**
Tilmæli um tilboð og fígging v.m verða tøk á fundinum.

**Tekniska nevnd 10. mars 2020:** Útsett.

**Ískoyti:**
Lisitatión um vegarbeiði at dagføra Jøkulstræti og útvega fleiri p-pláss varð hildin 05.03.2020.

Sp/f Ráð hevur staðið fyri útbjóðingini. Tríggir arbeiðstakarar vóru bodnir at geva tilboð og allir lótu tilboð inn.

Innkomnu tilboðini vóru hesi.
1) Tilboð frá Tórhalli Hansen uppá kr. 2.399.200,- uttan mvg
2) Tilboð frá RTS Contractors uppá kr. 2.893.372,- uttan mvg
3) Tilboð frá KONSAX uppá kr. 2.625.977,- uttan mvg

**Ískoyti:**
Samlaði kostnaðurin er væl oman fyri metingina frá mars 2019. Arbeiðið varð ikki mett átrokandi tá, og peningur varð ikki tøkur tá.
Nú sethús eru bygd við niðara borð á Jøkulstræti, verður boðað frá avvatnings trupulleikum, ið einast kunnu loysast við at dagføra vegin.
Arbeiðið kann tillagast og bjóðast út av níggjum.
Ein tillaging er gjørd av umsitingini, og er metingin 1,9 mió. v. 6,25% mvg.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at:

- Samráðast við Tórhall Hansen, ið átti lægsta boðið, um eina tillagaða loysn, mett til 1,9 mió. v. mvg.
- Játta 815.000 kr. av 6875, L00002 framfluttur løgukarmur ógreinað, 639.000 kr. av 6875, L00001 Løgukarmur fyri árið, og 546.000 kr. av 6875, LK 68999, Kloakkir.
- Beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 02. mai 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at umsitingin útinnir tær tillagingar, sum nevndin ynskir.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2022:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. mai 2022:** Einmælt samtykt.

# 125/22 Kirkjugarðsleiðin í Hoyvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.04.2021 | 64/21 | 21/01366-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.04.2021 | 90/21 | 21/01366-1 |
| 3 Býráðsfundur | 29.04.2021 | 122/21 | 21/01366-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2021 | 144/21 | 21/01366-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 22.09.2021 | 215/21 | 21/01366-1 |
| 6 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 223/21 | 21/01366-1 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.05.2022 | 108/22 | 21/01366-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 18.05.2022 | 132/22 | 21/01366-1 |
| 9 Býráðsfundur | 25.05.2022 | 125/22 | 21/01366-1 |

**Upprunin til málið**
Hoyvíkar kirkja umframt borgarar í Hoyvík hava í fleiri umførum víst á ynski um at fáa betra um kirkjugarðsleiðina, soleiðis at líkbilurin við fylginum kann fara umvegis Dalin Langa niðan í kirkjugarðin.

**Lýsing av málinum**
Hoyvíkar kirkja varð bygd í 2007, og liggur sunnan fyri miðstaðargøtuna Karlamagnusarbreyt. Kirkjugarðurin er staðsettur norðan fyri Klingruna.

Í dag koyrir líkbilurin eftir Løgmannabreyt, tá líkfylgið fer seinastu ferðina úr kirkjuni niðan í kirkjugarðin. Hetta verður ikki mett sum ein serliga virðilig leið, umframt at leiðin tykist rættiliga long.

Enn eru ikki nógvar gravir í brúk í kirkjugarðinum, men ynskiligt hevur verið, at seinasta leiðin úr kirkjuni niðan í kirkjugarðin verður betra og gjørd meiri virðilig.

Heildarætlanin fyri Karlamagnusarbreyt vísir á, at kirkjutorgið, sum er norðan fyri kirkjuna og gongur yvir til skúlan eystaneftir og parkeringsøkið vestaneftir skal gerast til eitt kirkjutorg, sum kann brúkast av borgarum í Hoyvík til hátíðarhald, umframt at skúlin kann brúka økið í gerandisdegnum. Torgið skal somuleiðis gerast við eini av- og á skipan, soleiðis at møguligt verður at seta fólk og børn trygt av, tá tey antin skulu í skúla ella kirkju. Harumframt vísir heildarætlanin á eina leið frá hesum torginum yvir til verandi gøtu í Dalinum Langa, sum síðani skal bindast í kirkjugarðin, soleiðis at líkfylgið kann fara beina leið niðan í kirkjugarðin umvegis Dalin Langa.

Loysn skal finnast á, hvussu leiðin kann gerast í økinum millum Hoyvíkar skúla og bústaðarøkið Myllutjørn, umframt at ein loysn má finnast á, hvussu leiðin fer tvørtur um Klingruna. Harumframt skal gøtan betrast, soleiðis at líkbilurin kann koyra á gøtuni.

Tað er ikki ætlanin, at aðrir bilar enn líkbilurin skulu kunna koyra hesa leiðina, so neyðugt verður við eini forðing í báðum endunum á leiðini.

**Lógir, ásetingar o.a.**

A3 í 3. Grundumráði í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu - Økið verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.

D1 í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu - Umráðispartarnir D1 verða í síni heild lagdir til almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál og tílíkt. Økið fram við Hoydalsá kann einans verða skipað og bygt sambært serstakari byggisamtykt fyri økið.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tekniska deild upplýsir, at neyðugt verður at taka hædd fyri áarløki, sum gongur frá Mylnutjørn oman í ítróttar/skúlaøkið.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
Kirkjugarðsleiðin_yvirlitstekning_j. nr. 21/01366-2

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:

- at farið verður undir at skipa kirkjugarðsleiðina frá kirkjutorginum niðan í kirkjugarðin,
- at umsitingin setir arbeiðið í gongd,
- at játta 250.000 kr. av konto 6275, Fríðkan av kommununi, L00001, Løgukarmur fyri árið, til nýggja íløgu “Kirkjugarðsleiðin í Hoyvík” á konto 6275, Fríðkan av býnum, at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 21. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 29. apríl 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Kirkjugarðsleiðin varð grundað á skipanaruppskot boðin út til 2 veitarar, og komu 2 tilboð inn.
Maskingkoyring við Karl Paturson bjóðaði 1.358.040,00
Sp/f Berghestar bjóðaði 1.255.332,29

Útboðið varð skipað í 3 høvuðspunkt umframt byggipláss.

0. Byggipláss
1. Nýggj og tillagað gøta millum kirkjuna og parkeringsøkið við Hoyvíkar skúla
2. Nýggj gøta millum verandi gøtu til Klingruna við innkoyring til kirkjugarðin
3. Breiðkan og umvæling av verandi gøtu millum nýggja gøtu 1 við Hoyvíkar skúla og nýggja gøtu 2 við kirkjugarðin

Til ber at seta arbeiðið í verk grundað á játtanina á 250.000,-, men játtanin røkkur einans til partvís at seta pkt. 3 í gongd.
Av tí at verkætlanin varð boðin út grundað á yvirskipað skipanaruppskot, eru størri sannlíkindi fyri at eykaarbeiði verða.
Neyðugt er við meirjáttan fyri at seta samlaðu verkætlanina í verk.

**Skjøl:**
21/01366-8 kirkjugarðsleiðin útbjóðing 2021

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at

- Játta kr. 1.250.000 á konto 6275, L62047, Kirkjugarðsleiðin í Hoyvík, fíggjað við at játta kr. 950.000 av LK62046, Løgukarmur fyri fríðkan av býnum og kr. 300.000 av LK62035, Løgukarmur fyri vetrarfriðing.

  og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. september 2021:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið at gera kirkjugarðsleiðina fór í gongd í november 2021.

Kirkjugarðsleiðin er býtt í 3 petti.

1. Nýggj og tillagað gøta millum kirkjuna og parkeringsøkið við Hoyvíkar skúla –
    a. Skúlin mótmælti farleiðini, tí at hon lá ov tætt uppat skúlanum og ynsktu tey at gøtan verður løgd longri uppi í skráanum í størri fjarstøðu frá skúlanum.
    b. Eigarafelagið við Myllutjørn óttaðist, at kirkjugarðsleiðin verður brúkt til vanliga ferðslu og mótmælti hesum. Tey ynsktu eisini, at ein skreiðibakki verður gjørdur í økinum frá Myllutjørn til parkeringsplássið við Hoyvíkshøllina
2. Nýggj gøta millum verandi gøtu til Klingruna við innkoyring til kirkjugarðin –
    a. er komin væl áleiðis
3. Breiðkan og umvæling av verandi gøtu millum nýggja gøtu 1 við Hoyvíkar skúla og nýggja gøtu 2 við kirkjugarðin –
    a. er mestsum komin á mál og góðkend av teimum ið koyra líkbilin

Umsitingin gjørdi eitt uppskot til umlegging av gøtupetti 1, og varð hetta uppskotið lagt fyri á fundi í skúlastýrinum 10.02.2022.
Skúlastýrið tók undir við uppskotinum til umlegging av gøtuni.
Skreiðibakkin er ikki tikin við í uppskotið, og er ivasamt um tað kann innarbeiðast í broyttu farleiðina.

Umlagda gøtan er munandi meira krevjandi at gera, eftirsum talan verður um nógvan grevstur, brekking og størri tilfarsnýtslu fyri at byggja undirlagið til gøtuna og skráarnar upp.

Arbeiðstakarin metir, at henda umlegging hevur ein meirkostnað við sær á 437.755,69 kr.

Harumframt verður neyðugt við átøkum at tryggja at ongin ferðsla verður á Kirkjugarðsleiðini undantikið líkbilur, gangandi og súkklandi. Forðingar verða settar við innkoyringina oman fyri skúlan, oman fyri hoyvíkshøllina og við sambandi til Klingruna, og forboðsskelti har allar gøtur koma inná leiðina.
Mælt verður somuleiðis til at fríðka um, planta og gera ljós á hetta økið. Mettur kostnaður 100.000,- kr.

**Skjøl:**
21/01366-24 10_02_2022 Kirkjugarðsleiðin Hoyvíkar skúli_framløga skúlastýrið

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at játta kr. 540.000,00 á konto 6275, L62047, Kirkjugarðsleiðin í Hoyvík av LK62997, Lendisgøtur og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. mai 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. mai 2022:** Einmælt samtykt.

## 126/22 Broyting av almennu byggisamtyktini fyri matr. nr. 4a til A3 øki, í smb. við útstykking oman fyri Argjahamar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.11.2021 | 207/21 | 21/04189-1 |
| 2 Býráðsfundur | 25.11.2021 | 301/21 | 21/04189-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.12.2021 | 256/21 | 21/04189-1 |
| 4 Býráðsfundur | 16.12.2021 | 321/21 | 21/04189-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.05.2022 | 107/22 | 21/04189-1 |
| 6 Býráðsfundur | 25.05.2022 | 126/22 | 21/04189-1 |

**Upprunin til málið**
Stórur fólkavøkstur heldur fram í kommununi og tískil er tað týdningarmikið, at kommunan, við síðuna av tí privatu vinnuni, eisini heldur fram at standa á odda fyri at veita borgarum bústaðir.
Kommunuætlanin vísir á góð lendi til býarvøkstur, m.a. oman fyri Argjahamri. Samtykt er at fara í gongd við eina ætlan at skipa økið bæði við set-, raðhúsum og íbúðum, umframt øki til møguliga stovnsbygging, sí mál nr. 21/01777 og kortskjal *Uppskot til útstykking oman fyri Argjahamri.*

**Lýsing av málinum**
Á býráðsfundi hin 30. september 2021 bleiv einmælt samtykt at játta pening til at fyrireika lendi oman fyri Argjahamri til byggibúning til bústaðir.

Alt økið liggur sum er í 4. Grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sum er ætlað landbúnaði, sí kortskjal *Áðrenn broyting*.

Fyri at kunna byggja bústaðir á lendinum, skal byggisamtyktin broytast. Avgerð er ikki endaliga tikin um hvussu stór grundstykkini skulu vera, hvussu býtið av bústaðarsløgum skal verða og hvussu fríøkini í útstykkingini verða skipaði og tryggjaði. Heldur ikki er avgjørt hvør stovnur, afturat verandi skúla og dagstovni, skal byggjast í økinum, men væntast kann, at tørvur verður á einum røktarheimi við røktaríbúðum í framtíðini. Fyri at hava møguleika fyri at skipa økið, við omanfyri nevndu eindum, er neyðugt at broyta økið til A3 øki í almennu byggisamtyktini sí kortskjal *Eftir broyting*, og tá nærri ætlanir fyriliggja, gera eina serstaka byggisamtykt fyri økið.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri A3 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:
§7, stk. 1. Økið verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.

§7, stk. 2. Útstykkingar kunnu bert gerast sambært serstakari byggisamtykt.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tað er týdningarmikið, at útstykkingin í størstan mun tillagar seg lendið og at eitt nú leiðin niðan á Kongavarða verður varðveitt.
Ein umhvørvis árinismeting eigur at verða gjørd av lendinum, áðrenn farið verður undir at skipa tað endaligt, soleiðis at atlit kunnu verða tikin til serlig viðurskiftir í økinum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
21/01777 – Útstykking oman fyri Argjahamar.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Økið liggur í 4. Grundumráði, og skal broytingin tí góðkennast av friðingarmyndugleikanum.

**Skjøl**
21/04189-3 Áðrenn broyting
21/04189-3 Eftir Broyting
21/01777-3 Uppskot til útstykking oman fyri Argjahamri
21/04189-7 Utstykking omanfyri Argjahamar_ Støðumynd.
21/04189-7 26.10.2021
21/04189-7 Eftir broyting 08.12.2021
21/04189-14 Feilur rættaður fyri part av Argjahamri.pdf

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | x | x | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta byggisamtyktina fyri økið sambært ætlanini fyri økið, sum er í umbúna, frá 4. grundumráði til A3 øki og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. november 2021:** Samtykt at broyta byggisamtyktina fyri økið frá 4. grundumráði til A3 øki og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. november 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur arbeitt víðari við staðseting av bústøðum umframt vegalinjuni til nýggju útstykkingina á Argjahamri sí korskjal *Utstykking omanfyri Argjahamar_ Støðumynd*. Hetta merkir, at broytingarnar í almennu byggisamtyktini, ið blivu samtyktar 25. novembur 2021, skulu tillagast

Lagt verður upp til at gera eitt øki við raðhúsum beint oman fyri verandi raðhúsaøki og tí skal ein rond av økinum, ið upprunaliga bleiv samtykt at broytast til D3 øki, sí kortskjal *26.10.2021*, broytast til A3-øki til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, sí kortskjal *Eftir broyting 08.12.2021.*

Byggisamtyktin verður tillaga í økinum matr. 256, 4gr og 4gp, soleiðis at hon fylgir linjuføringini av vegum og møkrum í økinum. Harumframt er ásetingini fyri norðara endan av útstykkingini víðka eitt vet eystureftir soleiðis at hon passar til tillagaða uppskotið, ið umsitingin hevur arbeitt víðari við, sí korskjal *Utstykking omanfyri Argjahamar_ Støðumynd*.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta byggisamtyktina fyri økið sambært tillagaða kortskjali *Eftir broyting 08.12.2021* og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. desember 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Ruth Vang luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 16. desember 2021:** Einmælt samtykt**.**

**Ískoyti:**
Kunnað verður um, at í feilur er í kortskjalinum til uppskotið til broyting av almennu byggisamtyktini fyri part av Argjahamri, Argir, og allur matrikulin 256 er ikki blivin tikin við í broytingaruppskotið. Hetta er sum sagt ein feilur og tí verður neyðugt at fáa hetta broytt soleiðis, at allur matrikul 256 kemur at liggja í A3 øki, sí viðhefta kortskjal *Feilur rættaður fyri part av Argjahamari.pdf.*

Býarskipanarnevnd landsins metur tað verða neyðugt at leggja málið til almenna hoyring aftur og tískil verður hetta gjørt í næstum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at leggja broytingaruppskotið, sambært kortskjal *Feilur rættaður fyri part av Argjahamari.pdf.* fyri part av Argjahamri til almenna hoyring og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. mai 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 25. mai 2022:** Einmælt samtykt.

## 127/22 Nýggj serstøk byggisamtykt við Miðhorn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.04.2022 | 99/22 | 22/00644-2 |
| 2 Býráðsfundur | 28.04.2022 | 91/22 | 22/00644-2 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.05.2022 | 104/22 | 22/00644-2 |
| 4 Býráðsfundur | 25.05.2022 | 127/22 | 22/00644-2 |

**Upprunin til málið**
Á vetri 2020/2021 varð økið við Miðhorn boðið út til bygging av bústøðum. Avtala varð gjørd við byggifelag, almenna byggisamtyktin fyri økið broytt, og nú er verkætlanin komin so væl ávegis, at klárt er at gera serstaka byggisamtykt, ið skipar økið neyvari.

**Lýsing av málinum**
Umsøkjari hevur sent inn skipanaruppskot, sí skjal *Miðhorn skipanaruppskot A3 mappa februar 2022_minkað.pdf,* ið vísir hvussu økið er ætlað skipað við raðhúsum, íbúðarbygningum, felagshús, bilskýlum, skúrum o.ø. Dentur er lagdur á at laga byggingina til lendið og útiumhvørvið, og ferðsla er skipað við atliti til spælandi børn og fólk til gongu.

Skipanaruppskotið fatar um:
- 21 raðhús við tilhoyrandi bilskýli, skúri og hjalli.
- Íbúðarhús við 36 íbúðum, goymslum, tøkni v.m.
- 2 íbúðarlonir við 28 íbúðum tilsamans (stendur 22 í skipanaruppskotinum, men hetta er eftirfylgjandi broytt til 28).
- Felagshús.
- Felags verkstaður.
- Torg, spæliøki og uttandura uppihaldsøki.

Í mun til útbjóðingarskrivið, so er økið skipað á ein eitt sindur annarleiðis hátt, fyrst og fremst grundað á avbjóðingar við at leggja veg inn á økið, men mett verður, at skipanaruppskotið skipar økið á ein skynsaman hátt, og er í trá við endamálið fyri útbjóðingini av økinum til bústaðabygging.

Nýggja bústaðarøkið við Miðhorn liggur í A1 og A2 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Byggingin í økjunum A1, A2, A1, A4, B1, B2 og C, sí skjal *Støðumynd,* er í trá við ásetingarnar fyri økini. Byggingin G og H eru íbúðarbygningar, men liggja í A1 øki, ið annars er lagt til stakhús/tvíhús/raðhús. Hendan byggingin er somuleiðis hægri enn mest loyvda hædd sambært almennu byggisamtyktini. Í serstakari byggisamtykt ber til at víkja frá ásetingunum um nýtsluna (íbúðarbygging) og hæddina og mett verður at hetta er ráðiligt, grundað á samlaðu skipanina og lendisviðurskiftini í økinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri A1 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a. hesar:
- Loyvt er einans at byggja stakhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð, og eftir serloyvi frá byggivaldinum tvíhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð og raðhús og tílíkar bústaðir fyri eitt húski.
  Í sambandi við bústaðarøki kann byggivaldið geva serloyvi til annað virksemi sum handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til, treytað av, at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum sethúsabýlingur og sum lúka treytirnar í flokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu.

- Hús við vanligari mønureising mugu einans verða bygd í tveimum hæddum umframt nýttum lofti og mugu ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og 9 m til mønuna. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.
- Verða hús bygd við einvegis takhalli ella sløttum takið kann tann lægra síðan í mesta lagi verða 6 m til hægsta punkt við útvegg og tann hægra síðan í mesta lagi verða 7,5 m.
- Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at byggja íbúðir.
  Í serstakari byggisamtykt kann víkjast frá ásetingum um tal av hæddum og hæddarásetingum, har lendið er soleiðis háttað, at tað fellur natúrliga inn.

Ásetingar fyri A2 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a. hesar:
- Loyvt er einans at byggja hús í fleiri hæddum til bústaðarendamál. Í sambandi við bygging skal tó bera til at gera rúm til felags nýtslu sum t.d. stovnar, vaskirúm o.a. fyri tey, ið har búgva.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tann parturin av Velbastaðvegnum, sum útstykkingin skal bindast í, er framvegis landsvegur, men hevur Tórshavnar kommuna søkt um at yvirtaka vegin – samráðingar hesum viðvíkjandi eru í gongd. Um vegurin ikki er yvirtikin áðrenn byrja verður at stykkja út, skal íbinding góðkennast av Landsverk."

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- *Útbjóðing av útstykking við Miðhorn í Tórshavn,* journal nr. 20/03654.
- *Broyting av almennu byggisamtyktini við Miðhorn, matr. nr. 1160a, Tórshavn,* journal nr. 21/01539.
- *Umsókn um góðkenning av heildarætlan og fyribils byggiloyvi matr. nr. 1160a, Miðhorn, Tórshavn,* journal nr. 22/00438.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
- *Serstøk byggisamtykt fyri Miðhorn*, journal nr. 22/00644-7.
- *Miðhorn skipanaruppskot A3 mappa februar 2022_minkað.pdf,* journal nr. 22/00644-4.
- *Støðumynd.pdf,* journal nr. 22/00644-1.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | x | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | x | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | x | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☒**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna uppskotið til serstaka byggisamtykt við Miðhorn, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 28. apríl 2022:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**

Síðani málið var fyri á seinasta fundi í byggi- og býarskipanarnevndini, hevur umsøkjarin tillagað verkætlanina smávegis, soleiðis at tað nú eru 41 íbúðir í øki B og 35 íbúðir í øki C, harav 5 stk. í niðastu hædd eru alternativ til annað virksemi so sum handlar, kontór o.a. Býarskipanarliga verður ikki mett, at hetta broytir stórvegis uppá ætlanirnar og ynskta dámin í økinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna broytingarnar í serstøku byggisamtyktini við Miðhorn sambært skjalinum *Serstøk byggisamtykt við Miðhorn 28.04.22,* og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. mai 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 25. mai 2022:** Einmælt samtykt.

# 128/22 Serstøk byggisamtykt fyri íbúðarbygging við Hvannasundsgøtu, matr. nr. 999a og 999ai, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.11.2018 | 210/18 | 18/03714-1 |
| 2 Býráðsfundur | 29.11.2018 | 279/18 | 18/03714-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.05.2022 | 105/22 | 18/03714-1 |
| 4 Býráðsfundur | 25.05.2022 | 128/22 | 18/03714-1 |

**Upprunin til málið:**
Byggi- og býarskipanarnevndin samtykti á fundi 12. september 2018 at loyva íbúðarbygging á matr. nr. 999a og 999ai, Tórshavn, og í hesum sambandi at serstøk byggisamtykt verður gjørd fyri økið.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Tórshavnar kommuna hevur fingið umsókn frá eigara av matr. nr. 999a og 999ai, Tórshavn, um at fáa loyvi at byggja íbúðir á økinum. Talan er um ein bygning í tveimum hæddum, við tilsamans 18 íbúðum, við tilhoyrandi goymslurúmum. Hvør íbúð er uml. 78 $m^2$ til støddar, og hevur tvey kømur. 27 p-pláss eru á felags parkeringsøki – sambært almennu byggisamtyktini skal minst 1 p-pláss verða fyri hvørjar 75 $m^2$ íbúð, og eru sostatt fleiri p-pláss, enn minstakravið í almennu byggisamtyktini. Harumframt er øki lagt av til felags spælipláss, sí kortskjal *Skipan*. Vegatkoma verður frá Hvannasundsgøtu.

Økið liggur í A1 økið í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, og sambært ásetingunum fyri A1 øki *"kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at byggja íbúðir".* Á ognini stóð áður ein vinnubygningur, sum er tikin niður

Økið liggur í bústaðarøki við stak- og tvíhúsum, og er avmarkað av Heygsvegnum fyri eystan og Hvannasundsgøtu fyri vestan. Eitt sindur av lendismuni er ímillum Hvannasundsgøtu og øki byggisamtyktarinnar, og er hetta somuleiðis við til at avmarka økið. Innan tað natúrliga avmarkaða økið liggur eitt annað stakhús.

Í mun til ljósviðurskifti og útsýni verður ikki mett, at nýggi bygningurin ávirkar grannalagið nógv øðrvísi, enn niðurtikni bygningurin gjørdi.

Serstaka byggisamtyktin tryggjar fleiri íbúðir í býnum og býartættar í ein ávísan mun, og er hon sostatt í tráð við bústaðarpolitikkin hjá Tórshavnar kommunu.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri A1 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu eru m.a.:
§ 5. Ásetingar fyri umráðispartin A1 í 3. Grundumráði

Stk. 1. Loyvt er einans at byggja stakhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð, og eftir serloyvi frá byggivaldinum tvíhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð og raðhús og tílíkar bústaðir fyri eitt húski.

Í sambandi við bústaðarøki kann byggivaldið geva serloyvi til annað virksemi sum handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til, treytað av, at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum sethúsabýlingur og sum lúka treytirnar í flokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu.

Stk. 9. Í serstakari byggisamtykt er ikki loyvt at fara upp um tey nýtslustig, ið eru í stk. 5, tá ið økið verður roknað sum heild.

Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at byggja íbúðir.

Í serstakari byggisamtykt kann víkjast frá ásetingum um tal av hæddum og hæddar ásetingum, har lendið er soleiðis háttað, at tað fellur natúrliga inn.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
18/03714-23 Serstøk byggisamtykt matr 999a Hvannasundsgøta pdf.
18/03714-23 Kortskjal 1
18/03714-23 Kortskjal 2

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna serstøku byggisamtyktina við Hvannasundsgøtu sambært skjølunum og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 29. november 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við at nýggja serstaka byggisamtyktin fyri íbúðarbygging við Hvannasundsgøtu hevur ligið til almenna hoyring, frá 14. desember 2018 til 25. januar 2019, eru trý mótmæli og eitt broytingaruppskot innkomin, øll frá grannum við Heygsvegin og á Hvannasundsgøtu.

Viðurskiftini, ið verða førd fram í mótmælunum, eru í høvuðsheitum hesi:

1. Mett verður ikki, at Hvannasundsgøta er egnað til øktu ferðsluna, av tí at har er smalt og ongar gongubreytir eru.
2. Mælt verður til at brúka verandi íbindingarveg við Heygsvegin ístaðin. Tað verður ikki mett at vera ein trupulleiki við tveimum íbindingarvegum, ið liggja tætt, av tí at Heygsvegurin er góður og breiður, við lítið av ferðslu.
3. Vegna manglandi vendipláss á Hvannasundsgøtu verður tað mett at vera óráðiligt at loyva einum stórum bygningi afturat.

4. Eigarin av matr. nr. 999ac ynskir at fremja makaskifti við matr. nr. 999a, soleiðis at hóskandi vegur kann gerast frá Heygsvegnum niðan á íbúðarøkið.
5. Grannarnir ynskja, at tað í serstøku byggisamtyktini verður sett treyt um, at íbúðarbygningurin ikki má staðsetast nærri enn 8,5 m frá markinum eystureftir móti Heygsvegnum. Hetta fyri at varðveita dámin á sethúsabýlinginum.
6. Grannarnir ynskja somuleiðis, at tað verður sett treyt um, at planeringshæddin á matr. nr. 999a og 999ai ikki kann verða hægri enn 5 metrar undir Hvannasundsgøtu.

Umboð fyri umsitingina hava verið á ástaðarfundi við umboð fyri grannalagið, har grannarnir vístu á ferðsluviðurskiftini í økinum, og greiddu nærri frá broytingaruppskotinum, sum leggur upp til, at íbúðarbyggingin nýtir verandi íbindingarveg, sum er í Heygsvegin.

Ad. 1-4. Umsitingin metir broytingina, sum er nevnd í viðmerking 4, vera skilagóða, og er hon viðgjørd av ferðslunevndini, sum somuleiðis tekur undir við henni. Sostatt verður makaskifti framt millum matr. nr. 999ac og 999a framt, og verandi vegatkoman frá Heygsvegnum betra og nýtt sum atkoma til økið. Uppskotið til serstaka byggisamtykt verður broytt sambært hesum, og verður lagt til almenna hoyring av nýggjum.

Ad. 5. Skipanin av økinum skal verða sambært kortskjølunum í serstøku byggisamtyktini, ið vísir at ein ávís frástøða til sethúsaøkið verður hildin, sí *kortskjal 2.*

Ad. 6. Planeringshæddin verður ásett av byggivaldinum sum vanligt, við atliti til verandi lendi, veg og grannastykkir.

Nøkur ár eru fráliðin, síðani málið var viðgjørt seinast, og nú er nýggjur eigari av ognini. Í hesum sambandi er verkætlanin tillagað, t.d. er íbindingarvegurin fluttur sambært pkt. 4 í viðurskiftunum, í ískoytinum omanfyri og talið av íbúðum, goymslurúmum og parkeringsplássum er lækkað. Annars er skipanin av økinum tann sama.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta serstøku byggisamtyktina sambært viðhefta skjali, *Serstøk byggisamtykt við Hvannasundsgøtu 07.04.22*, j.nr. 18/03714-24, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. mai 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 25. mai 2022:** Einmælt samtykt.

| | **Býráðsfundur**<br>25. mai 2022 | Blað nr.: 542<br>Formansins merki: |
|---|---|---|

# 129/22 Ársroknskapur fyri Tórshavnar kommunu 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 24.05.2022 | 145/22 | 22/01978-1 |
| 2 Býráðsfundur | 25.05.2022 | 129/22 | 22/01978-1 |

**Upprunin til málið**
Kommunustýrislógin inniheldur ásetingar um grannskoðan av kommununum.

**Lýsing av málinum**
-

**Lógir, ásetingar o.a.**
Kommunustýrislógin:

Sambært §§ 45-47 er tað eitt krav, at kommunur hava óhefta og sakkøna grannskoðan, ið er ríkisgóðkend ella skrásett.

Sambært § 38, stk 3, nr 4 hevur fíggjarnevndin ábyrgd av at leggja grannskoðaðan roknskap saman við grannskoðanarfrágreiðingini [*grannskoðaraprotokollin, red*] fyri kommunustýrið til góðkenningar og undirskrivingar.

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
- Grannskoðaraprotokoll fyri ársroknskapin 2021
- Àrsroknskapur 2021

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, fyrisitingarstjórin og fíggjarleiðarin mæla býráðnum umvegis fíggjarnevndina til at góðkenna grannskoðaða ársroknskapin fyri 2021.

**Fíggjarnevndin 24. mai 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. mai 2022:** Einmælt samtykt.

# 130/22 Framflytingar fyri roknskaparárið 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 24.05.2022 | 146/22 | 22/01979-1 |
| 2 Býráðsfundur | 25.05.2022 | 130/22 | 22/01979-1 |

**Upprunin til málið**
Sambært játtanarreglunum hjá Tórshavnar kommunu verða meir- og minninýtslur fluttar fram til komandi ár. Framflytingar skulu játtast sum eykajáttan í býráðnum, tvs skulu hava tvær viðgerðir.

Meirnýtsla, sum í mesta lagi kann vera 5% av nettojáttanini, verður flutt til næsta ár.
Meirnýtslan skal vera burtur innan trý ár.

Minninýtsla, sum í mesta lagi kann vera 10% av nettojáttanini, verður flutt til næsta ár. Um serlig viðurskifti gera seg galdandi, og ynski er um at flyta meiri enn 10% til árið eftir, kann ein umbøn um hetta sendast avvarðandi fyrisitingarstjóra.

Ársroknskapurin fyri 2021 er gjørdur upp, og gjørt er eitt yvirlit yvir rakstrar- og íløgujáttanir at flyta fram til 2022.

Samlaða framflytingin íroknað Tórshavnar Havn er fyri rakstur 16,5 mió.kr netto og fyri íløgur 159,6 mió.kr og er útgreinað soleiðis:

| | **Rakstur** | **Íløgur** |
|---|---|---|
| TK | 5,8 mió. | 84,4 mió. |
| TH | 10,7 mió. | 75,2 mió. |
| **Íalt** | **16,5 mió.** | **159,6 mió.** |

Víst verður til uppskot til broytingar í framflytingum í skjali nr. 22/01979-4
Samlaða minninýtslan fyri Tórshavnar kommunu frárokna Tórshavnar Havn er 5,8 mió.kr. Á §§ 1, 2, 3 og 7 er talan um minninýtslur, ímeðan tað á §§ 4, 5 og 6 er talan um meirnýtslur.

Framflytingin á **§ 1 Kommunal fyrisiting** er ein minninýtsla á íalt kr 4,4 mió.kr. Stórur partur av hesi framflytingini, 1,7 mió.kr, er á 1313 Teknisk fyrisiting. Á 1317 Heilsu- og umsorganarfyrisitingini verða fluttar fram 845 tkr, á 1311 Miðfyrisiting 585 tkr og 490 tkr á 1110 Býráðið. Mælt verður ikki til nakrar innanhýsis flytingar ísv framflytingarnar.

Á **§ 2 Almanna- og heilsumál** er ein samlað framflyting av avlopi upp á 16,7 mió.kr. Tey størstu avlopini eru á 2721 Røktartænastur 6,6 mió.kr og á 2722 Tilboð 9,9 mió.kr. Størsti parturin av minninýtsluni á 2722 Tilboð kemst av, at Urd ikki kom í fullan rakstur fyrr enn eftir summarfrítíðina, og demensdepilin lat upp seinni enn ætlað. Á 2721 koma 4 mió.kr av minninýtsluni av, at meirjáttan til røktarøkið, sum býráðið hevði samtykt, ikki var møgulig at seta í verk vegna starvsfólkatrot. Størsta flytingin av einum stovnsnummari er 5,5 mió.kr av 2722 Tilboð, og størsta flytingin á eitt stovnsnummar er 4,7 mió.kr á 2720 Heilsuhúsið. Fyri aðrar framflytingar, sí skjal.

Samanlagda minninýtslan á **§ 3 Børn og ung** er netto 5,9 mió.kr. Skotið verður ísv framflytingina upp at gera flytingar inni á greinini fyri íalt 11,5 mió.kr. Minninýtslan á dagstovnum minkar ísv flytingina úr 11,5 niður í 4,6 mió.kr. Aðrar kontur, ið avlop verður flutt yvir á, er t.d tímar vegna serligan tørv við 1,3 mió.kr. Á kontuna fyri broytingar og minni umvælingar á stovnum verða fluttar 1,4 mió.kr, og 1,5 mió.kr verður flutt til at dekka meirnýtslu, tí tað ikki var nóg nógv játta til serstovur í 2021. Umframt aðrar minni upphæddir til aðrar kontur.

**§ 4 Undirvísing** hevur eina meirnýtlsu á 3,6 mió.kr ella 8%. Ongar broytingar ella innanhýsis flytingar eru.

**Á § 5 Mentan og frítíð** er talan um eina meirnýtlsu á 5,2 mió.kr svarandi til 8%. Ongar broytingar ella innanhýsis flytingar eru.

Á **§ 6 Teknisk mál** er ein meirnýtsa á 14,5 mió.kr ella 10%. Í samband við framflytingina er uppskot um innanhýsis at flyta 2 mió.kr frá 7317 Talgilding til borgaran til kontu 20910 Aðrar inntøkur.

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Stjórnin og fíggjarleiðarin mæla til at játta framflyting á 16,5 mió.kr netto til rakstur og 159,6 mió.kr til íløgur. Eisini verður mælt til at gera broytingar í framflytingini sambært hjálagda skjali 22/01979-4.

**Fíggjarnevndin 24. mai 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið sum eykajáttan, ið krevur tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 25. mai 2022:** Einmælt samtykt.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>25. mai 2022 | Blað nr.: 546<br>Formansins merki: |

## 131/22 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 16.02.2022 | 57/22 | 22/00009-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 51/22 | 22/00009-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 16.03.2022 | 87/22 | 22/00009-1 |
| 4 Býráðsfundur | 24.03.2022 | 74/22 | 22/00009-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 20.04.2022 | 116/22 | 22/00009-1 |
| 6 Býráðsfundur | 28.04.2022 | 101/22 | 22/00009-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 18.05.2022 | 138/22 | 22/00009-1 |
| 8 Býráðsfundur | 25.05.2022 | 131/22 | 22/00009-1 |

**Upprunin til málið**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>25. mai 2022 | Blað nr.: 547 |
| | Formansins merki: |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarliga/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2022:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2022:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 24. mars 2022:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mars verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 20. apríl 2022:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 28. apríl 2022:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri apríl verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2022:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 25. mai 2022:** Framlagt og góðkent.

| | **Býráðsfundur**<br>25. mai 2022 | Blað nr.: 548<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

## 132/22 Søla matr.nr. 135pu, Hoyvík. ( Oman GII 7 )

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 24.05.2022 | 148/22 | 22/01143-6 |
| 2 Býráðsfundur | 25.05.2022 | 132/22 | 22/01143-6 |

**Upprunin til málið.** Kommunan hevur keypt grundstykkið aftur, og hevur lýst stykkið til sølu hjá ognarmeklara.

**Lýsing av málinum.**
Sethúsagrundstykki matr.nr. 135pu, Hoyvík. Vídd 318m2. Stykkið er grovplanerað,

Sí mál 14/05387, samtykti býráðið 28. oktober 2021 at keypa stykkið aftur, og í fyrsta lagi at bjóða møguligum umsøkjara við bráfeingis tørvi stykkið til keyps til kostprís, og í øðrum lagi at lýsa stykkið alment til sølu.

Endaligt afturkeypsskeytið varð tinglýst til kommununa uttan rættarviðmerkingar hin 28.01.2022.

Ongin umsøkjari við bráfeingis tørvi, hevði áhuga fyri keypa grundstykkið, og heitti kommunan í mars 2022, á ognarmeklaran Skyn um at selja grundstykkið í fríðari sølu. Skyn metti søluprísin til 1,295 mill. kr.
Í Teldubrævi hin 20.05.2022, boðar Skyn frá at hægsta boð er 1,550 mill. kr og at onki mótboð er komið innan freist.

**Lógir, ásetingar o.a.** Kommunustýrislógin.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl.** Kortskjal.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á Stjórnarskrivstovuni, mæla til at selja stykkið fyri innkomið boð áljóðandi kr. 1.550.000,00

Søluskeytið vísir til verandi tinglýstar servituttir.

**Fíggjarnevndin 24. mai 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Elsa Berg luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 25. mai 2022:** Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, tveimum blonkum og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Birita B. Iversen, Bjørg Dam, Jákup Dam, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Blankt atkvøddu: Elsa Berg og Jón Kragesteen.

**FUNDURIN LOKIN KL. 19:00**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen | Annfinn Brekkstein | Tróndur Sigurðsson |
| Kári Johansen | Kristianna Winther Poulsen | Bjørg Dam |
| Elsa Berg | Jákup Dam | Annika Olsen |
| Birgir Nielsen | Ruth Vang | Jón Kragesteen |
| | Birita Baldvinsdóttir Iversen | |